| **Býráðsfundur**<br>24. april 2025 | Blað nr.: 240<br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|

# GERÐABÓK

**Dato:** 24. april 2025 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 94/25 – 119/25**

**FUNDARLEIÐARI:**
Elsa Berg

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Heidi Lava Elgeirsdóttir
Annita á Fríðriksmørk
Anja Weyhe
Elin Heðinsdóttir Joensen (fyri Kristionnu Winther Poulsen)
Bergur Robert Dam Jensen
Guttormur í Skála
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Høgni Vilhelmsen
Astrið Breckmann

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðna Justinussen
Fríður Dalsgarð
Eyðfríð Jacobsen
Mortan Simonsen
David Andresen

**LUTTÓKU IKKI:**
Kristianna Winther Poulsen

**SKRIVARI:**
Jóan Petur Hentze

**PROTOKOLLFØRARI:**
Olga Knudsen/Janus Haraldsen/Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 94/25 | 25/04948-1 | Birgir Nielsen berst frá at møta á býráðsfundi 24. apríl 2025 | 243 |
| 95/25 | 25/05082-1 | Kristianna Winther Poulsen berst frá at møta á býráðsfundi 24. apríl 2025 | 244 |
| 96/25 | 25/00163-1 | Mál beind í nevndir 2025 | 245 |
| 97/25 | 25/00189-1 | Val av hegn- og vatnsýnisnevnd fyri 4 ár | 247 |
| 98/25 | 25/04848-1 | Val av tveimum nevndarlimum til Sjálvsognarstovnin Við Tjarnir | 248 |
| 99/25 | 25/02320-1 | Gøtunavnanevndin: Áheitan á Gøtunavnanevndina um at finna nýtt veganavn til part av Sundsvegi, í samb. við at Innkomuvegurin sker vegin av | 251 |
| 100/25 | 25/01670-1 | Staðseting til lestrarheim í Havn | 253 |
| 101/25 | 25/04377-1 | Býarskipan 2025 | 255 |
| 102/25 | 25/02214-5 | Djóraverndarfelagið : Áheitan um at finna eitt øki til djóraherberg - 17/02152 | 258 |
| 103/25 | 25/04098-1 | Uppraðfesting gøtur í Kirkjugørðunum | 262 |
| 104/25 | 25/00428-1 | Lendisgøtur | 265 |
| 105/25 | 25/02604-1 | Kollafjørður - Heildarætlan fyri miðstaðarøkið | 271 |
| 106/25 | 25/03681-1 | Arkitekturpolitikkur fyri Tórshavnar kommunu - 22/05054 | 275 |
| 107/25 | 25/04245-1 | Útskiftan og umvælingar á Brennistøðini í 2025 | 280 |
| 108/25 | 25/00167-1 | Skipan av virkseminum á Hjalla og á Sundi - 24/01098 | 282 |
| 109/25 | 25/04246-1 | Ymisk arbeiði á Brennistøðini í 2025 - fíggjað av løgukonto 7175 renovasjón | 285 |
| 110/25 | 25/00949-1 | Broyting í almennu byggisamtyktini – US krevur serstaka byggisamtykt ísmbv. sundurbýti av matriklum | 288 |
| 111/25 | 25/01104-1 | Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað | 291 |
| 112/25 | 25/03985-1 | Framflytingar fyri roknskaparárið 2024 | 295 |
| 113/25 | 25/03788-1 | Niðurtøka av Svarta pakkhúsi á Eystara Mola | 298 |
| 114/25 | 25/04357-17 | Elinnlegging á Bacalao | 300 |
| 115/25 | 25/04036-1 | Uppskot til reglugerð fyri útlutan av íbúðum | 302 |
| 116/25 | 25/04602-1 | Mannagongdir viðvíkjandi koyripengum til býráðs- og nevndarlimir | 304 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 117/25 | 25/03984-1 | Ársroknskapur fyri Tórshavnar kommunu 2024 | 307 |
| 118/25 | 25/00161-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2025 | 309 |
| 119/25 | 25/03625-10 | Umsókn um byggiloyvi til eitt nýtt røktarheim á Stórubrekku, RÁS, matr. nr. 138a, Hoyvík - 24/01675 | 311 |

**Til viðgerðar**

# 94/25 Birgir Nielsen berst frá at møta á býráðsfundi 24. apríl 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 94/25 | 25/04948-1 |

**Málslýsing**
Birgir Nielsen hevur boðað frá, at honum berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Astrið Breckmann, eru loknar.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Tikið til eftirtektar.

# 95/25 Kristianna Winther Poulsen berst frá at møta á býráðsfundi 24. apríl 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 95/25 | 25/05082-1 |

**Málslýsing**
Kristianna Winther Poulsen hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Elin Heðinsdóttir Joensen, eru loknar.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Tikið til eftirtektar.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>24. april 2025 | Blað nr.: 245 |
| | Forkvinnunnar merki: |

# 96/25 Mál beind í nevndir 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.01.2025 | 34/25 | 25/00163-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 49/25 | 25/00163-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 68/25 | 25/00163-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 96/25 | 25/00163-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 30. januar 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Tikið til eftirtektar.

# 97/25 Val av hegn- og vatnsýnisnevnd fyri 4 ár

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 09.01.2025 | 20/25 | 25/00189-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 97/25 | 25/00189-1 |

**Málslýsing:**
Sbrt. § 44 í lóg nr. 171 "Om hegn og markfred" frá 18. mai 1937 og § 15 í lóg nr. 169 "Om benyttelse af indsøer og vandløb" frá 18. mai 1937 velur býráðið 3 hegn- og vatnsýnismenn.

Samstundis verða valdir 3 tiltakslimir.

Í nevndini sita: Sigurd Hansen, Bergur Dam Jensen, Bjartur Brekkstein, Karlot Hergeirsson, Andreas Nielsen. Varalimir: Toni Dam, Niels á Reynatúgvu, Rúni S. Patursson, Heri Ó. Dam, og Fróði Olsen.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja nevndarlimir í nevndina, umframt tiltakslimir.

**Býráðsfundur 09. januar 2025:** Vald vórðu:

| **Fastir limir** | **Tiltakslimir** |
|---|---|
| Brandur í Dali | Tórður Patursson |
| Birita Fritleifdóttir Kjærbæk | Høgni Rasmussen |
| Jóhan Simonsen | Eddie Joensen á Kjalnesi |
| Andreas Nielsen | Jóhan Carl Dam |
| Bjartur Brekkstein | Jan Vestergaard |

**Ískoyti:**
Bjartur Brekkstein hevur boðað frá, at hann tekur seg úr nevndini og tí skal nýggjur limur veljast.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Einmælt samtykt at velja Sigurð Hansen í hegn- og vatnsýnisnevndina.

# 98/25 Val av tveimum nevndarlimum til Sjálvsognarstovnin Við Tjarnir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 98/25 | 25/04848-1 |

**Upprunin til málið**
Aðalfundur 28. apríl 2025

**Lýsing av málinum**
Í skrivi dagf. 7. apríl 2025 verður kallað inn til ársfund hjá sjálvsognarstovninum Við Tjarnir mánadagin 28. apríl 2025 kl. 10:00. Fundurin er Við Tjarnir.

Upplýst verður, at fundurin verður hildin sambært viðtøkum stovnsins (§7), og Tórshavnar Kommuna verða boðin at møta. Á fundinum skal m.a. veljast tveir nevndarlimur, sum umboð fyri Tórshavnar Kommunu, til nevndina hjá Við Tjarnir.

Skráin fyri fundin:
1. Frágreiðing frá nevndini um farna ár
2. Framløga og góðkenning av ársfrásøgn og roknskapi
3. Fráboðan um møguliga broyting í nevndini
4. Val av grannskoðara
5. Ymiskt

**Lógir, ásetingar o.a.**
**Grein 4** í viðtøkunum siga um val av nevnd.

Stovnurin verður stýrdur av eini nevnd, sum hevur 5 limir, har Tórshavnar kommuna velur 2, Vinnuhúsið velur 1, ÍSF velur 1, og Visit Faroe Islands P/f, velur 1 lim. Fyri hvønn nevndarlim,verður valdur ein varalimur, sum verður boðsendur til fund, um viðkomandi nevndarlimur ikki fær møtt.

Nevndin verður vald fyri 2 ár í senn. Nevndarlimir kunnu afturveljast.

Fer ein nevndarlimur frá í úrtíð, verður nýggjur nevndarlimur valdur av tí, sum hevur valt viðkomandi.

Í sambandi við sjálva byggingina av stórhøllini, velur nevndin eina bygginevnd til saman við nevndini at standa fyri byggingini. Hendan bygginevnd heldur uppat aftaná at byggingin er liðug, og høllin formliga latin stovninum.

**Grein 5** sigur um skipan av nevnd:

Nevndin skipar seg sjálv við val av formanni og næstformanni.

Nevndin hevur fund so ofta formaðurin, ella minst tveir av nevndarlimunum halda tað vera neyðugt.

Nevndarsamtyktir verða avgjørdar við vanligum meiriluta. Standa atkvøðurnar á jøvnum, er formansins, ella í fráveru hansara, næstformansins atkvøða avgerandi.

Í sambandi við val av nevnd, skal miðast eftir, at nevndin verður vald í semju, soleiðis at nevndin hevur førleikar innan fíggjarviðurskifti, rakstur og fyriskipan av størri tiltøkum í ítróttar- og mentanarsamanhangi, umframt vanlukkutilbúgving.

Nevndin er viðtøkufør tá í minsta lagi tríggir av nevndarlimunum eru til staðar.

Førd verður nevndarprotokol um tað, sum fer fram á nevndarfundi.

Nevndin hevur dagligu leiðsluna av stovninum um hendi, herundir ábyrgd fyri at gera sáttmálar um raksturin av høllini, umframt setan og uppsøgn av starvsfólki.

Nevndin ásetur leiguna fyri høllina og ansar eftir, at stovnurin verður rikin í samsvari við endamálsgreinina.

Nevndin skal arbeiða fyri at fáa eitt rakstrarúrslit, sum gevur møguleika fyri hóskandi avsetingar til viðlíkahald.

Keyp, avhending ella veðseting av fastari ogn, kann bert fara fram við samtykt av samdari nevnd, umframt loyvi frá Tórshavnar kommunu.

Lántøka kann bert fara fram við góðkenning frá Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Til seinasta nevndarval vórðu umboð fyri ávikakist býráðsmeirilutan og minnilutan vald í nevndina við hvørs sínum varalimir.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Viðtøkur fyri Sjálvsognarstovnin Við Tjarnir
21/03920 Stórhøll - Føroya Arena/við Tjarnir

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at velja tveir limir í nevndina fyri Sjálvstoganarstovnin Við Tjarnir.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Heðin Mortensen skjeyt upp at velja velja Heidi Lava Elgeirsdóttir sum lim og Kristionnu Winther Poulsen sum varalim.

Annfinn Brekkstein skjeyt upp at velja velja Trónd Sigurðsson sum lim og Annfinn Brekkstein sum varalim.

Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at taka undir við uppskotunum.

| | Býráðsfundur<br>24. april 2025 | Blað nr.: 251<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

# 99/25 Gøtunavnanevndin: Áheitan á Gøtunavnanevndina um at finna nýtt veganavn til part av Sundsvegi, í samb. við at Innkomuvegurin sker vegin av

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Gøtunavnanevndin | 25.02.2025 | 4/25 | 25/02320-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 12.03.2025 | 38/25 | 25/02320-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 02.04.2025 | 59/25 | 25/02320-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 99/25 | 25/02320-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Tekniska umsiting hevur heitt á Gøtunavnanevndina um at finna nýtt navn til ovasta part av Sundvegnum.
Ovasti partur av Sundsvegnum er skorin av, í samb. við at Innkomuvegurin er gjørdur.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Gøtunavnanevndin 25. februar 2025:** Nevndin mælir til, at ovasti partur av Sundvegnum fær navnið «undir Villingafossi»**.**

**Mentamálanevndin 12. mars 2025:** Umrøtt.

**Mentamálanevndin 02. apríl 2025:** Samtykt at taka undir við gøtunavnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Samtykt at beina málið aftur í mentamálanevndina.

## 100/25 Staðseting til lestrarheim í Havn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 31.03.2025 | 56/25 | 25/01670-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.04.2025 | 66/25 | 25/01670-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 100/25 | 25/01670-1 |

**Upprunin til málið**
Fróðskaparsetur Føroya veksur støðugt, og eru fleiri út- og umbyggingar í gongd fyri at betra um karmarnar kring Setrið.

Hagstovan hevur staðfest, at búfestið í Føroyum er so veikt, at fimti hvør føroyingur ikki longur býr í Føroyum. Hetta er til stóran skaða fyri sosialu, búskaparligu og demografisku burðardygdina í landinum. Ein trupulleiki er, at føroyingar flyta av landinum fyri at fara undir lesnað. Tískil er eitt av aðalmálunum hjá Setrinum at fáa fleiri næmingar at støðast longri í Føroyum og harvið bjóða enn fleiri útbúgvingar í Føroyum.

Trupulleikin er samstundis, at Føroyar og Tórshavnar kommuna mangla bústaðir til tey lesandi – vit hava fá lestrarheim, og um ætlanin er at vaksa um næmingatal og útboðið av útbúgvingum, so mugu tað somuleiðis lestrarbústaðir til.

**Lýsing av málinum**
Fróðskaparsetur Føroya hevur sett niður arbeiðsbólk, sum hevur til endamáls at kanna møguleikan fyri at byggja eitt lestrarheim í havn. Í bólkinum er eitt umboð fyri tey lesandi, Ulla Joensen, stjóri í Elektron og Árni Ellefsen, ráðgevi og fyrrverandi stjóri í Føroya Banka.

Hesin arbeiðsbólkurin hevur vent sær til Tórshavnar kommunu fyri at kanna, hvørjir møguleikar eru í mun til staðsetingar av tílíkum lestrarheimi. Í fyrsta umfari er ynskiligt at fara undir eina verkætlan við á leið 3-400 lestrarbústøðum, og er ætlanin við tíðini at kunna byggja tilsamans umleið 900 lestrarbústaðir í Havn.

Fleiri staðsetingar hava verið umrøddar, tó er eingin endalig staðseting funnin enn. Hugt hevur verið eftir økinum kring Frælsið og har umleiðir, soleiðis at eitt komandi lestrarheim kemur at verða bygt tætt upp at Kampus.

Tórshavnar kommuna eigur tó ikki nógv lendi í hesum økinum, men mett verður, at onkrir møguleikar eru. Somuleiðis eigur landið nakað av lendi í hesum økinum, umframt at nakað av óbygdum lendi er privat. Mett verður, at alt økið kring komandi Kampus verkætlanina eigur at verða eftirhugt við tí fyri eyga, at troyta allar møguleikar, soleiðis at eitt veruligt lestrarheim kann verða bygt í økinum, so skjótt fígging er fingin til vega.

Yvirskipaða visjónin fyri Tórshavnar kommunu er, at høvuðsstaðurin verður ein **vakstrardepil í Norðuratlantshavi**. Og er eitt av undirpunktunum til visjónina, at vit vilja, at høvuðsstaðurin er virkin við nýggjum og mennandi útbúgvingartilboðum og dygdargóðum altjóða granskingarumhvørvi.

Mett verður, at Tórshavnar kommuna eigur at vera ein virkin viðspælari á frontinum at finna eina nøktandi staðseting til eitt komandi lestrarheim í Havn – og tískil verður mælt til, at umsitingin fer undir arbeiðið at finna eina nøktandi staðseting til bygging av einum lestrarheimi til 3-400 lesandi.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin hevur verið í samband við Landsverk, sum somuleiðis hevur vent sær til kommununa viðv. fyrispurninginum um at koma í ein dialog um møguleikarnar við evt. at umbyggja verandi Ellisheim til lestrarbústaðir, tá Røktarheimið í Hoyvík verður liðugt bygt, umframt at umrøða staðsetingar, sum kommunan sær sum upplagdar.

Landsverk hevur hugt upp á ymiskar staðsetingar í og við økið, sí skjal nr. *25/01670-5, Møguleikar fyri lestrarbústøðum í Kampusøkinum_Landsverk*.

Enn hevur eingin ítøkiligur fundur verið um ætlanina hjá Landsverki, og helst eiga báðar ætlanirnar at verða umrøddar í felag, soleiðis at partarnir vita av hvørjum øðrum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Enn hevur málið ikki verið til umrøðu aðrastaðni í kommununi, men tá ítøkiligu staðsetingarnar fara at verða umrøddar, verða avvarðandi partar tiknir við í umrøðuna og niðurstøðurnar.

**Skjøl**
Skjal nr. *25/01670-5, Møguleikar fyri lestrarbústøðum í Kampusøkinum_Landsverk*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei
Enn eru ongar fíggjarligar avleiðingar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at umsitingini verður heimilað at finna eina nøktandi staðseting til bygging av einum lestrarheimi, og at politiska skipanin kann játta, at kommunan er sinnað at finna eina hóskandi staðseting til bygging av einum lestrarheimi til uml. 3-400 lesandi, og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. apríl 2025:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Einmælt samtykt.

## 101/25 Býarskipan 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
| --- | --- | --- | --- |
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 31.03.2025 | 61/25 | 25/04377-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 101/25 | 25/04377-1 |

**Upprunin til málið**
Í samgonguskjalinum stendur skrivað, at samgongan:

- vil raðfesta bygging av bústøðum,
- fer undir at dagføra almennu byggisamtyktirnar
- krevur, at fyrilit verða havd fyri nátturu, lívmargfeldi og trivnaði í øllum nýggjum bústaðarverkætlanum og í sambandi við útbyggingar av ymsum slag.

Við hesum orðum verður víst á tørvin á eini dagførdari býarskipan fyri kommununa, sum tekur atlit til bygging av fleiri bústøðum, samstundis sum fyrilit verða havd fyri náttúru, lívmargfeldi og trivnaði.

**Lýsing av málinum**
Tórshavnar kommuna fekk sína fyrstu býarskipan (Almennu byggisamtyktina) í 1972, sum síðani hevur verið dagførd í staklutum gjøgnum árini. Samfelagsliga gongdin seinastu árini hevur víst, at Býarskipanin ikki hevur verið tíðarhóskandi, hvørki í mun til stóra bústaðartrýstið, tørvin á fleiri íbúðum, ei heldur í mun til at verja okkara náttúru, fríøkir og lívmargfeldi.

Yvirhøvur er sera avmarkað, hvussu nógv kommunur ella Føroyar sum heild hava raðfest býar- ella landsplanlegging ígjøgnum tíðirnar. Einasta planlóg í Føroyum er løgtingslóg um býarskipanir frá 1954.

Infrakervi hevur lutvíst verið raðfest, soleiðis at tað í dag er at kalla gott infrakervi kring alt landið – eisini í Tórshavnar kommunu.

Arbeiðið við at dagføra býarskipanina ella býarplanleggingina hevur tó verið sera avmarkað, og hetta hevur merkt kommununa seinastu árini, tá samfelagið hevur verið í støðugari menning og eftirspurningurin eftir bústøðum hevur verið og framhaldandi er sera stórur.

Nógva byggingin seinastu árini hevur samstundis traðkað á nógv av okkara dýrabaru náttúru, og m.a. tí er løgtingslóg um náttúruvernd frá 2023 gjørd. Endamálið við lógini er, *at røkja margfeldið og tær vistfrøðiligu tilgongdirnar í náttúruni, bæði fyri náttúruna sjálva og fyri náttúruna sum grundarlag undir burðardyggum virksemi, tilfeingi, mentan, heilsu og trivnaði hjá Føroya fólki nú og í framtíðini.*

Bústaðarmentanin er somuleiðis í eini broyting. Tað er ikki burðardygt framhaldandi at útstykkja til stór sethús, tí lendið er avmarkað, og tað er tí meiri skynsamt at byggja minni bústaðareindir, so sum raðhús ella íbúðir. Frá at føroyingar einamest hava búð í sethúsum, so hevur verið neyðugt við eini hugburðsbroyting innan bústaðarmentanina, soleiðis at føroyingar eisini vilja búgva í minni bústøðum.

Harumframt er neyðugt í sambandi við endurskoðan av býarskipanini, at hugt verður eftir, hvussu verandi býur og bygging kann endurskapast og tættast, soleiðis at býurin í framtíðini ikki veksur longur út í hagan, men byggir á verandi dygdir, hentleikar og infrakervi, samstundis sum náttúran í býnum verður varðveitt og tryggjað. Í dag eru fleiri eldri vinnuøkir, sum helst kundu verði umlagað til miðstaðarkend økir við blandaðari vinnu og bústøðum.

Við hesum í huga, og grundað á tørvin at endurskoða kommunalu býarskipanina (Almennu byggisamtyktina), er ætlanin at fara undir eina tilgongd at lýsa, hvørjir møguleikar eru innan fyri verandi býarmark. Tilgongdin hevur til endamáls at skapa meirbygging í verandi býi, samstundis sum náttúran og lívmargfeldið verður tryggjað.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Almenna byggisamtyktin og serstøku byggisamtyktirnar fyri Tórshavnar kommunu.
Løgtingslóg um Býarskipanir frá 1954.
Løgtingslóg um náttúruvernd frá 2023.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tórshavnar kommuna fekk sína fyrstu Kommunuætlan í 2014, sum síðani varð dagførd í 2020. Í Føroyum er eingin lóg, sum krevur kommunuætlanir, og Tórshavnar kommuna er tann einasta kommunan í Føroyum, sum hevur eina kommunuætlan.

Kommunuætlanin leggur upp til, at býurin verður skipaður grundað á tríggjar miðdeplar, har bústaðarøkini skulu byggjast útfrá, samstundis sum gerandishentleikar so sum dagstovnar, skúlar, frítíðarhentleikar, matvøruhandlar osfr. verða raðfestir í miðdeplunum.

Fyri tíggju árum síðani tóktist landið at standa yvir fyri stórum avbjóðingum við, at stór fráflyting var av landinum, og tí var væntaði fólkavøksturin sera ivasamur; antin kundi stígur koma í, ella kundu vit vænta ein lítlan fólkavøkstur. Síðani 2014 hevur fólkavøksturin ligið á umleið 2% árliga, sum hevur havt við sær ógvisligar útbyggingar í samfelagnum sum heild. Undirsjóvartunlar, innkomuvegurin og infrakervið sum heild er vaksið heilt nógv, landsjúkrahúsið er undir útbygging, skúlar eru bygdir, nógvir bústaðir eru bygdir, og grundað á stóra fólkavøksturin er eitt stórt trýst á kommunur um at veita enn fleiri bústaðir.

Í 2018 fekk kommunan sín fyrsta bústaðarpolitikk, sum grundað á bústaðartrotið og avmarkaða byggilendið legði upp til, at fleiri íbúðir skuldu byggjast. Almenna byggisamtyktin varð ikki klár ella dagførd til hesa lutfalsliga stóru broytingina innan bústaðarmentanina, og tískil hevur býarskipanin verið heldur nógv litað av bráðræsispolitikki *(politikkur sum er framdur í skundi og illa umhugsaður).*

Grundað á hesa gongdina seinastu árini, er tað av alstórum týdningi, at farið verður undir at dagføra býarskipanina fyri kommununa, soleiðis at býarskipanin verður burðardygg og harvið tekur atlit til okkara náttúrutilfeingi, samstundis sum meirbyggingin í kommununi verður gjørd út frá planløgdum karmum.

Ætlanin er at fara undir eina miðvísa greining av verandi býi í mun til hesi evni:
1. **Varðveiting/menning av verandi dygdum** (Hvat skal varðveitast? – skráseting av náttúrukílum, haga, fríøkjum, urtagørðum, varðveitingarverdum býarumhvørvum osfr).
2. **Gagnnýta lendið á mest skynsaman hátt** (Hvar og hvussu kann byggjast meir, hvussu ávirkar hetta fólkatalið? – skráseting av tættleikanum í verandi bygda umhvørvið).
3. **Knýta býin og fólkið saman** (Hvussu ávirkar meirbyggingin borgaran, hvussu kann ferðslan skipast betri, kunnu alternativar loysnir takast í brúk?).

Út frá hesi skrásetingini, umframt politiskum kjaki og fakligari sparring er ætlanin at koma fram til eina nýggja og meiri burðardygga býarskipan fyri býin. Ætlanin er at raðfesta arbeiðið beinanvegin, soleiðis at komandi útbyggingar taka útgangsstøði í væl grundaðari planlegging, og soleiðis at málini hjá samgonguni um at hava fyrilit fyri náttúru, lívmargfeldi og trivnaði í øllum nýggjum bústaðarverkætlanum og í sambandi við útbyggingar av ymsum slag, verða sett í verk beinanvegin og koma at liggja til grund undir øllum komandi avgerðum innan økið.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Fleiri fyrispurningar um bygging av íbúðum, útstykking til vinnuøkir osfr. eru skrásettir í journalini, og koma hesir fyrispurningar somuleiðis at verða tiknir við í tilgongdini.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

-

**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at heimila umsitingini at fara undir at dagføra býarskipanina fyri Tórshavnar kommunu við tí endamáli at tryggja eina meiri burðardygga býarskipan, har fyrilit fyri náttúru, lívmargfeldi og trivnaði verða tryggjað, samstundis sum økir verða løgd av til meirbygging og tættari bygging.
- at málið verður beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Einmælt samtykt.

# 102/25 Djóraverndarfelagið : Áheitan um at finna eitt øki til djóraherberg - 17/02152

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 31.03.2025 | 63/25 | 25/02214-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.04.2025 | 67/25 | 25/02214-5 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 102/25 | 25/02214-5 |

**Upprunin til málið**
Víst verður til mál nr. *17/02152, Djóraverndarfelagið*: Áheitan um at finna eitt øki til djóraherberg. Tilgongdin í málinum sæst í skjali nr. *17/02152-12, Djóraverndarfelagið: Áheitan um at finna eitt øki til djóraherberg.*

Djóraverndarfelagið sendi Tórshavnar kommunu eina umsókn um eitt lendi til at byggja eitt djóraherberg á.

Djóraverndarfelagið arbeiðir við at bøta um umstøðurnar hjá djórum í Føroyum, og tey upplýsa, at hetta arbeiðið er avbjóðandi, og tørvur er at skipa umstøðurnar betri enn tær eru í dag. Tørvurin á djóraverndarfelagnum veksur hvørt ár, tí fráboðanir og málini eru ofta álvarsom. Tey fáa nógvar fráboðanir, eitt nú frá privatpersónum, løgregluni, almannaverkinum og landssjúkrahúsinum.

Ein tann størsta avbjóðingin hjá felagnum er at hýsa teimum djórunum, tey fáa inn. Tískil søkja tey um eitt øki, har tey eisini kunnu byggja eitt djóraherberg.

Tí ynskja tey at byggja eitt herberg til djórini á uml. 400 $m^2$. Við hesum fáa tey hjálpt enn fleiri djórum á ein meira skipaðan hátt. Samanlagt er tørvur á einum øki á uml. 6000 fermetrar.

**Lýsing av málinum**
Sum eisini sæst í gomlu málslýsingini, so hava nógvar staðsetingar verið umrøddar, men torført hevur verið at finna fram til endaligu staðsetingina.

Seinastu tíðina er umsitingin vend aftur til staðsetingina úti í vika, matr. nr. 1078.

Økið, sum Djóraverndarfelagið søkir um skal vera uml. 6.000 fermetrar til víddar. Sí uppskot til øki at lata Djóraverndarfelagnum:




Mælt verður til, at endaliga skapið og støddin á matriklinum verður nágreinað í tilgongdini við at gera endaliga sáttmálan.

Matr. nr. 1078 er leigutrøð, og er trøðin leigað út til privat persón. Umsitingin hevur verið í sambandi við núverandi leigara, sum er sinnað at lata part av trøðni til Djóraverndarfelagið. Hon ynskir tó at varðveita part av trøðni til egna traðarnýtslu. Ynski frá núverandi traðarleigara er, at skúrurin verður verandi á tí partinum av trøðni, sum hon framhaldandi kemur at varða av.

Djóraverndarfelagið upplýsir, at tey eru sinnaði at samstarva við Aktingarmannin í mun til upptøku av djórum, og vísa tey eitt nú á, at tá tey hava fingið bygt djóraherbergið, so kundu tey t.d. yvirtikið onkur av djórunum til ansing, sum Aktingarmaðurin tekur upp.

Aktingarmaðurin hevur matr. nr. 1077a til upptøkutrøð, men manglar honum eitt hús á trøðni. Umhvørvisdeildin arbeiðir við málinum at byggja hús til aktingarmannin á matr. nr. 1077a – uml. 30 fermetrar, sum skal brúkast til upptøku av djórum, útgerð, goymslu o.a. Víst verður til mál nr. *25/03553, Nýtt aktingarhús á matr. nr. 1077a, Tórshavn.*

Umhvørvisdeildin upplýsir somuleiðis, at tað eigur at bera til at samstarva um ymisk viðurskiftir.

So statt er tað upplagt, at Djóraverndarfelagið verður staðsett í Vika, soleiðis at samvirkanin millum virksemini kann gerast.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í Almennu byggisamtyktini partvís í 4. grundumráðið, *sum er lagt til landbúnað, alment frílendi og tílíkt* og økisparti B3, *ætlað vinnuvirki, verksmiðjur og tílíkt og tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi*.

Mett verður, at eitt djóraherberg kann byggjast í tí partinum av trøðni, sum liggur í økisparti B3.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tað er av stórum týdningi at fáa málið viðv. staðsetingini avgreitt, soleiðis at Djóraverndarfelagið kann koma víðari við sínum ætlanum, og soleiðis at tey á nøktandi hátt kunnu virka fyri endamálinum hjá Djóraverndarfelagnum.

Uppskot til leigusáttmála sæst í skjal nr. *25/02214-4, Leigusáttmáli. Lendi til Djóraverndarfelagið*.

Vísandi til, at tað verður bygt á ognini, verður talan um leigusáttmála, sum er óuppsigiligur frá kommununar síðu í 25 ár. Tá hetta tíðarskeiðið er farið, kann sáttmálin sigast upp av báðum pørtum við eitt ára freist. Sí tó § 10 í sáttmálanum.

Tað er neyðugt, at frámatrikulera leigaða økið, og Djóraverndarfelagið kann tá veðseta bygning á leigaðum undirlendi, í sambandi við møguliga lántøku.

Tilsøgnin verður treytað av neyðugum loyvum frá almennum myndugleikum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
17/02152, Djóraverndarfelagið: Áheitan um at finna eitt øki til djóraherberg.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
*17/02152-12, Djóraverndarfelagið: Áheitan um at finna eitt øki til djóraherberg.*
*25/02214-4, Leigusáttmáli. Lendi til Djóraverndarfelagið*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

Tann parturin av trøðni, sum verður latin Djóraverndarfelagnum, skal frámatrikulerast. Útreiðslurnar fyri sundurbýtið fella á Tórshavnar kommunu sum eigara av trøðni.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til
- at partur áljóðandi á leið 6000 fermetrar av trøðni matr. nr. 1078 verður latin Djóraverndarfelagnum til teirra virksemi,
- at viðhefti leigusáttmáli verður samtyktur og
- at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. apríl 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri viðmerking, at grannar, ið búgva í økinum, skulu hoyrast, áðrenn møguligt leigumál verður sett í verk. Málið beint í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við málinum og mælir til at finna aðra staðseting, annaðhvørt úti í Havnardali ella í Kollafirði, sum áður hevur verið umrøtt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Tikið av skrá.

# 103/25 Uppraðfesting gøtur í Kirkjugørðunum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 31.03.2025 | 57/25 | 25/04098-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.04.2025 | 69/25 | 25/04098-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 103/25 | 25/04098-1 |

**Upprunin til málið**
Nógvar av gøtunum í kirkjugørðunum eru í sera ringum standi og treingja til ábøtur.

**Lýsing av málinum**
Arbeiðið at umvæla gøturnar í kirkjugarðinum við Velbastaðvegin varð boðið út í 2024 í innbodnari licitatión.

5 veitarar vórðu bodnir við og inn komu 4 tilboð. Sí *jnr 25/04098 samanberingar tilboð*.

Lægsta tilboð fyri øki B-L er samanlagt 706.082,74 kr.

Tilfar og burturkoyring av avgrivnum tilfari, umframt innbúgv og planting er ikki íroknað í tilboð frá arbeiðstakara.

Arbeiðið at umvæla A og C varð avtalað við arbeiðstakara við lægsta tilboðnum, sett í verk og goldið av rakstrarjáttan 2024, so langt hon rakk.

Ynskiligt er at halda áfram at umvæla tær gøturnar í kirkjugarðinum sum enn mangla at verða gjørdar, og at seta arbeiðstakaran í gongd við hetta arbeiðið.

Harumframt er tørvur á at fríðka um og planta í kirkjugarðinum smb. gróðursetingarætlanini fyri kirkjugarðin við Velbastaðvegin. Sí *jnr. 22/04567-4 Gróðursetingar- og innbúgvsætlan 11.11.2022.*

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Nógvar av gøtunum B-L eru í sera vánaligum standi og tað er átrokandi at fáa sett tær í góðan stand. Harumframt eru eisini skaðar frá yvirflatuvatni á gøturnar í nýggja partinum øki M og tørvur á at hampa kirkjugarðin, so hann aftur verður í virðiligum standi, við planting, lívd og støðum til uppihald fyri avvarðandi sum vitja kirkjugarðin.

Grundað á tilboð frá arbeiðstakara við lægsta tilboði er mettur kostnaður at umvæla allar gøturnar íroknað tilfar kr. 1.500.000.

Mælt verður til, at gróðursetingar- og innbúgvsætlanin verður boðin út og sett í verk fyri kr. 1.500.000 so langt tað røkkur.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Jnr. 22/04567 Gróðursetingarætlan fyri kirkjugarðin við Velbastaðvegin.
Jnr. 24/07046 Vallgarður kirkjugarðurin við Velbastaðvegin

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
jnr 22/04567-4 Gróðursetingar- og innbúgvsætlan 11.11.2022.
jnr 24/07046-2 Vallgarður 2024
jnr 25/04098-4 Samanberingar tilboð
jnr 25/04098-5 Yvirlit yvir kirkjugarðin

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | X | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6575 | LK65999 | Kirkjugarðar | 6575 | | | Gøtur, gróðurseting og innbúgv í kirkju-gørðunum | 3.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 3.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025/2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 500.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at játtaðar verða kr. 3.000.000 av kt. 6575, LK65999 Kirkjugarðar (íløgur), til nýggja verkætlan á kt 6575 við heitinum “Uppraðfesting gøtur, gróðurseting og innbúgv í kirkjugørðunum”
- at heimila umsitingini at gera avtalu við arbeiðstakara um omanfyri standandi arbeiði, og at seta arbeiðið í verk.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. apríl 2025:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini við tí broyting, at játtaða upphæddin av kt 6575, LK65999 Kirkjugarðar (íløgur), til nýggja verkætlan á kt 6575 við

heitinum “Uppraðfesting gøtur, gróðurseting og innbúgv í kirkjugørðunum”, verður kr. 2.683.000. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Einmælt samtykt.

# 104/25 Lendisgøtur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 31.03.2025 | 62/25 | 25/00428-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.04.2025 | 70/25 | 25/00428-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 104/25 | 25/00428-1 |

**Upprunin til málið**
Málið byggir á málið **Lendisgøtur 18/00992,** sum samlar viðgerð av játtanum til lendisgøtur í grønu økjunum frá og við 2018 til og við 2024. Sí jnr *18/00992-1, Lendisgøtur*.

**Lýsing av málinum**
Seinastu nógvu árini hevur kommunan lagt nógva orku í at byggja eitt gøtunet kring býin. Lendisgøturnar verða nógv brúktar og stimbra undir trivnað fyri borgarar og ferðafólk í kommununi.

Ætlanin er, at gøtukervið sum frá líður verður samanhangandi ferðslurás fyri ábæra ferðslu í kommununi, og at gøtur og smogur eisini verða arbeiddar inn í allar framtíðarútstykkingar og ætlanir, so ábæra ferðslan í størst møguligan mun sleppur undan bilaferðsluni.

Ein avbjóðing við gøtukervinum er, at játtanin til viðlíkahald ikki er nøktandi. Neyðugt er umframt at játta pening til nýggjar gøtur, eisini at játta pening til viðlíkahald av verandi gøtum, so tær alla tíðina verða brúkiligar og ikki fara ov illa.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Í løgtingslóg nr. 66 frá 30. mai 2024 um burðardygga ferðavinnu verður staðfest, at:

*Farleiðir*

*§ 7. Kommunan skal í samráð við bóndan, viðkomandi myndugleikar og stovnar merkja upp farleiðir og, við loyvi frá náttúrufyrisitingini, gera nýggjar farleiðir til tess at skipa ferðsluna uttangarðs.*
*Stk. 2. Kommunurnar hava ábyrgd av at halda farleiðirnar, nevndar í stk. 1, umframt tær gomlu bygdagøturnar.*
*Stk. 3. Tað er ábyrgdin hjá viðkomandi bónda at gera og halda farleiðirnar, har hann tekur eitt gjald sambært § 5, stk. 3, bæði innangarðs og uttangarðs.*
*Stk. 4. Landsstýrisfólkið við náttúrumálum kann áseta nærri reglur fyri, hvussu farast skal fram, tá ið farleiðir verða gjørdar.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Avlop av játtan *L62019, Lendisgøtur*, er 5.973.682,-kr.

Kr. 3.748.300,- eru sáttmálabundnar í avtalaðum arbeiðum.

Harumframt skal játtanin, saman við játtanini *L62058, Øki til tilfarsgoymslu*, á kr. 292.579 fíggja tilfar til slitlag á øllum teimum sáttmálabundnu gøtunum.

Somuleiðis er alneyðugt, at játtanin hevur eitt rásarúm til at gera gøtur í sambandi við útbygging av býnum, har grivið verður fyri leiðingum osfr.

Nógvar av gøtunum í kommununi eru komnar í sambandi við størri grevstrararbeiði og í samstarvi við aðrar verkætlanir. Seinastu gøtustubbarnir, sum eru gjørdir av hesum slagnum, eru gøturnar millum Klingurstjørn og nýggju útstykkingina oman fyri Argjahamar, sum verða gjørdar, tá leiðingar verða lagdar í lendið.

Royðutilfar til slitlag til gøturnar
Sí mál nr *23/05112 øki til tilfarsgoymslu.*

Royndirnar vísa, at haldbarasta tilfar til slitlag á gøtur er knúst royða. Veiting av royðu er sera óstøðug, og hevur royðutilfar í longri tíðarskeið verið mangulvøra. Av tí at tað ikki lætt at fáa fatur á royðu, so er tað týdningarmikið, tá royða vísir seg í sambandi við aðrar verkætlanir kring landið, at kommunan tá nýtir høvið at fáa gagnnýtt royðuna.

Í okt. 2023 varð samtykt at játta 600.000,- kr til keyp av royðu í sambandi við tunnilin við Innkomuvegin. Í sambandi við spreingingina var komið fram á tilfar, ið í fyrsta umfari var mett at vera royða, men sambært arbeiðstakaranum var hetta krit, ið ikki varð mett egnað til endamálið.

Men tá ið grivið varð fyri Stórhøllin, varð komið fram á royðutilfar, ið hevur verið brúkt sum tilfar til gøtubygging síðani. Arbeiðstakarin hevur knúst tilfarið, og kommunan keypti knústa tilfarið og hava vit nýtt tilfarið til slitlag á fleiri gøtum. Veitingin og góðskan av royðutilfarinum hevur tó verið rættiliga ymisk, og er arbeiðið við gøtubyggingini ávirkað av hesum.

Av tí at veitingin við royðutilfarinum er so óstøðug, er avtalað við arbeiðstakarar, at slitlagið er byggiharraveiting, ið verður goldin av *L62058, Øki til tilfarsgoymslu*.

Avtala er gjørd við Landsverk um at fáa royðu av Hústoft, og eftir ætlan verður veitingin á vári/summari 2025.

**1. Gøtur sum eru í gerð í løtuni og status:**
Sí skjal *jnr 25/00428-2, Raðfesting av lendisgøtum, ið verandi játtan røkkur til*

Gøtan við Sandá (eystanfyri)
Gøtan varð boðin út til 4 veitarar 08.04.2021. Tikið varð av bíligasta tilboðnum, og fór arbeiðið í gongd 20.09.2021.

Fyrsti parturin varð handaður Tórshavnar kommunu í 2022, og arbeiðið helt áfram inntil mitt í januar 2023, tá ið arbeiðið steðgaði orsakað av mótstøðu frá eigarum av grannaognum.

Nøkur petti av gøtuni koma inná privat øki, og krevst, at semja fæst við eigarar av grannaognum, áðrenn arbeiðið kann halda áfram. Sí mál nr. *25/03741 Gøtan framvið Sandá*

Um semja fæst, verður arbeiðið tikið uppaftur skjótast til ber, og verður arbeiðið tá raðfest at gerast liðugt.

Undir Fjalli til Rossagøtuna, Reynsgøta til Klingurstjørn, Viðarlund í Kerjum, ábøtur rundanum Hoyvíkstjørn
Gøturnar vórðu bodnar út til 5 veitarar 22.05.2024. ávikavist 3, 4 og 5 tilboð komu inn. Tikið varð av bíligasta tilboðnum hjá NK Entreprenørum.

Arbeiðið við gøtuni undir Fjalli til Rossagøtuna fór í gongd í juli 2024, og varð liðugt avhendað við smávegis manglum í august 2024.

Arbeiðið við gøtuni frá Reynsgøtu til Klingurstjørn fór í gongd 19.08.2024, og verður gøtan væntandi liðug í summar 2025.

Arbeiðstakari fer undir at gera gøtuna í Viðarlund í Kerjum og umvæling rundan um Hoyvíkstjørn, tá ið gøtan Reynsgøta til Klingurstjørn er liðug.

Gøta frá Klingruni til Stórhøll og umvæling av gomlu Sundsgøtuni
Arbeiðið varð boðið út í undirhondsboð 16.05.2023. 2 tilboð komu inn. Tikið varð av bíligasta tilboðnum hjá Maskingrevstur.

Arbeiðið byrjaði 01.11.202, og varð liðugt í desembur 2024.

Afturat upprunasáttmálanum var gerð av gøtu frá Kirkjugarðinum í Hoyvík til Sundsgøtuna, og umvæling av gomlu bygdargøtuni til Sunds. Umvæling av gomlu bygdargøtuni er í gongd nú.

<u>Gøta í Hoydølum Sanatoriuveg</u>
Arbeiðið varð boðið út í almennum útboði 06.10.2023. 11 tilboð komu inn. Tikið varð av lægsta tilboðnum hjá Urtagarðstænastuni.

Gøtan er avsett av Umhvørvisstovuni smb. frílendisætlan *sí jnr 14/01476-8 frílendisætlan endalig frágreiðing.pdf*.

Arbeiðið við gøtuni er ikki farið í gongd enn.

Ynski var at fáa lagt ein gøtustubba afturat til fyrsta fótbóltsvøllin í Tórshavn, har ætlanin eisini er at kunna um fótbóltsvøllin. Men endaligt loyvi er ikki givið til hetta enn.

<u>Gøta Frammi í Dal í Kollafirði:</u>
Gøtan Frammi í Dal, hevur verið í gongd í fleiri ár, har felagið Dalaross yvir fleiri ár hava gjørt eina gøtu frammi í Dal í Kollafirði.

Dalaross standa fyri arbeiðinum, og vórðu 250.000,- kr játtaðar til framhald av lendisgøtuni í 2024. Arbeiðið fór ikki í gongd í 2024, so játtanin verður flutt til 2025.

**<u>2. Neyðugar ábøtur á verandi gøtur:</u>**
Nógvar av gøtunum eru í sera vánaligum standi. Tí verður mælt til, at raðfesta umvæling av verandi gøtum ovarlaga, íroknað tilfar til royðu til slitlag.

<u>Undir Kongavarða til Glyvursveg</u>
Ein av gøtunum, ið átrokandi treingir til ábøtur og eigur at verða raðfest nú, er gøtan frá Undir Kongavarða til Glyvursveg.

Gøtan er sera brøtt og illgongd. Neyðugt er at umvæla og umskipa hana, soleiðis at partur av henni verður lagdur longri oman móti hamaranum, at plantað verður millum gøtu og granna, umframt at partur av gøtuni verður broytt til trappur, og partur umlagt við broyttum halli, *Sí skjal jnr 25/04343-3 Umlegging av gøtu millum undir Kongavarða og Glyvursveg.msg.*

Játtan má fáast til vega at seta arbeiðið í gongd.

Arbeiðið er ikki boðið út, men leysliga mett verður kostnaðurin áleið kr. 1 mió.

<u>Gøtur í bygdunum</u>
Ein upphædd varð sett av til nýgerð og hald av gøtum í bygdunum í 2024. Játtanin varð ikki brúkt og verður flutt til 2025.

**<u>3. Nýggjar lendisgøtur, sum mælt verður til at játta pening til, so tær kunnu setast í gongd:</u>**
Sí skjal j.nr *25/00428-3 Raðfesting av lendisgøtum, ið játtan skal fáast til*

<u>Gøtur í KMB – Ingibjargargøta o.a.</u>
Í sambandi við liðugtgerð av økjum rundan um Karlamagnusarbreyt, er atkoman frá Ingibjargargøtu til Torkilsgøtu átrokandi. Liðugtgerð av parkeringsplássinum at fríðka um og forða fyri at bilar koyra útav, má loysast saman við gøtuni.

<u>Gøtustubbi í Gundadali</u>

Ein gøtustubbi manglar fyri at gongusamband fæst millum smoguna niðan til Norðurlandahúsið oman í Ítróttaøkið í Gundadali.

<u>Gøta í fríøki Millum Gilja</u>
Í sambandi við Innkomuvegin er fríøki millum Millum Gilja og Innkomuvegin gjørt. Íbindingin við Flatarvegin varð flutt nakað, soleiðis at viaduktin undir Flatarveg var umløgd nakað. Gøta skal gerast gjøgnum økið, frá Flatarvegnum yvir til Oman Gil, soleiðis at ábæra ferðslan kann ferðast í grønum øki uttan um bilaferðsluna.

<u>Gøtustubbi Handan og á Landavegur</u>
Ein gøtustubbi at umvæla og umleggja, manglar so at høgligt gongusamband fæst.

<u>Gøtur í Viðarlundini í Gundadali</u>
Loyvi er fingið at gera gøtu í viðarlundini í Gundadali, men játtan skal fáast til vega, áðrenn arbeiðið kann setast í verk.

<u>Gøtur í Viðarlundini í Marknagili</u>
Skógrøkt landsins hevur tynt út í gróðursetingini í viðarlundini í Marknagili, og er tynt út, soleiðis at rúm er gjørt fyri, at gøtur kunnu gerast millum trøini.

Játtan skal fáast til vega, áðrenn hetta kann setast í verk.

<u>Gøta frá Miðhorni til Rossagøtuna</u>
Ynski frá eigarafelagnum millum Horna og eisini frá øðrum borgarum er at fáa atkomu til Rossagøtuna.

<u>Gøtur frá Sortudíki til Sundsvegin</u>
Gøta skal gerast í skógfriðaða økinum millum Sortudíki og Sundsvegin.
Gøtan skal eisini ganga gjøgnum privat øki. Skógfriðingarnevndin arbeiðir við at fáa semju við eigarar av 1457a. Semja má finnast, áðrenn gøtan kann fara í gongd. *Sí Jnr 22/04413 Staðseting av gøtu við Sundsvegin / Sortudíki*

<u>Gonguleið Gríms Kambans gøta</u>
Gríms Kambans gøta er sera nógv trafikerað og smøl. Fyri at geva fótgangaranum eina tryggari og betri gonguleið, eigur gonguleið at verða raðfest á fríøkinum millum Gríms Kambans gøtu og Skálatrøð.

<u>Gøtusamband Yviri við Strond</u>
Kloakkleiðing varð gjørd frá Bústøðum oman til reinsiverk við Tyrlupallin. Upplagt er, at gøta verður gjørd omaná hesa kloakkleiðing.

<u>Gøtusamband frá Skúlanum á Fløtum</u>
Um ein gøta verður gjørd frá Skúlanum á Fløtum til vegin Perskonugøta, er ein lagaligari gonguleið tøk fyri skúlabørnini, so tey sleppa undan nógvu ferðsluni á Landavegnum.

<u>Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið</u>
Jnr 18/00992 Lendisgøtur
Jnr 22/04413 Staðseting av gøtu við Sundsvegin / Sortudíki
Jnr 23/05112 øki til tilfarsgoymslu
Jnr 25/03741 Gøtan framvið Sandá
Jnr 25/04343 Umlegging av gøtu millum undir Kongavarða og Glyvursveg

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**

*j.nr 18/00992-80 Lendisgøtur*
*j.nr 25/04343-3 Umlegging av gøtu millum undir Kongavarða og Glyvursveg*
*j.nr 25/00428-2 Raðfesting av lendisgøtum, ið verandi játtan røkkur til*
*j.nr 25/00428-3 Raðfesting av lendisgøtum, ið játtan skal fáast til*
*j.nr 25/03741-1 Gøtan framvið Sandá*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | X | x | X | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | X | X | X | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | X | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | X | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | x | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

Verandi játtan verður brúkt til endamálið.

Mælt verður til, at umvæling av gøtuni undir Kongavarða til Glyvursveg verður sett í gongd av avlopinum á játtan, *L62019, Lendisgøtur*, og er tí ikki neyðugt at játta meiri pengar.

Tá raðfestu gøturnar eru gjørdar, verður mælt til, at játtanin verður hækkað til at seta nýggjar gøtur smb. *j.nr 25/00428-3 Raðfesting av lendisgøtum, ið játtan skal fáast til.*

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið, og tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til:
- at taka undir við at hildið verður áfram at byggja tær gøtur, sum eru samtyktar og eru lýstar í skjali *j.nr 25/00428-2 Raðfesting av lendisgøtum, ið verandi játtan røkkur til.*
- at heimila umsitingini at bjóða arbeiðini út og at seta arbeiðini í gongd innan fyri verandi játtan.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Kári Johansen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 09. apríl 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við tilmælinum frá Byggi- og býarskipanarnevndini við teirri broyting, at gøtan í Hoydølum Sanatoriuvegur verður raðfest aftarligari enn gøtan framvið Sandá framvið matr.nr. 1130, Tórshavn, og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur undir við tilmælinum frá Byggi- og býarskipanarnevndini, og beinir málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

**Fyri atkvøddu:** Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Tróndur Sigurðsson, Høgni Vilhelmsen og Astrið Breckmann.

**Ímóti atkvøddu:** Kári Johansen og Annfinn Brekkstein.

Annfinn Brekksteinn ynskir sína serstøðu viðmerkta í gerðabókina vísandi til, at hann heldur at atkvøtt varð undir skeivum fortreytum. Hansara fatan var, at býráðið fyrst skuldi atkvøða um uppskotið hjá minnilutanum í fíggjarnevndini, og at mannagongdin fyri atkvøðugreiðslu tí ikki var røtt.

# 105/25 Kollafjørður - Heildarætlan fyri miðstaðarøkið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 2 Kollafjarðarnevndin | 05.03.2025 | 7/25 | 25/02604-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 31.03.2025 | 54/25 | 25/02604-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 31.03.2025 | 15/25 | 25/02604-1 |
| 5 Havnanevndin | 01.04.2025 | 22/25 | 25/02604-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 09.04.2025 | 68/25 | 25/02604-1 |
| 7 Havnanevndin | 07.04.2025 | 25/25 | 25/02604-1 |
| 8 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 105/25 | 25/02604-1 |

**Upprunin til málið**
Hetta málið er framhald av málinum: 23/06514 Kollafjørður - Heildarætlan fyri mistaðarøkið – Sí málslýsingina frá uppruna málinum, mál nr. 23/06514-1, *Kollafjørður – Heildarætlan fyri miðstaðarøkið*.
Kunnað varð um málið í Kollafjarðarnevndini 07. oktober 2024, og verður mett, at gevur meining at kunna nevndina av nýggjum, nú nýggj nevnd er vald.

Staðbundna nevndin í Kollafirði gjørdi tá vart við, at bygdin kennir seg forsømda í Tórshavnar kommunu og at búðstaðarmøguleikarnir ikki eru nøktandi í økinum.
Ein greið niðurstøða hjá teimum er tískil, at ein ítøkilig og framsøkin búðstaðarætlan eigur at fara í gongd beinanvegin, samstundis sum at eitt arbeiði við at menna miðstaðarøkið í bygdini eigur at fáa fyrstu raðfesting.

Umsitingin hevur seinasta árið arbeitt við ymsum menningarætlaðum fyri Kollafjørð.
Eitt nú kunnu nevnast átøk sum ein útstykkingarætlanin á Lygnnesi og ein á Signabø, fríðkan av økinum við Halgannarstein við Sjógv, bygging av nýggjum dagstovni við Botnánna, broytingar av byggisamtyktum á neystaøkjunum í bygdini, staðseting av einum eldradepli í bygdini og lendiskeyp av jørð til spæliplláss á Signabø og sum heild til útstykkingar í bygdini. Men í 2024 varð avgerðin tikin at raðfesta enn fleiri menningarátøk í bygdini og at savna hetta í eina heildarætlan fyri Kollafjørð.

Heildarætlanin, sum hetta málið snýr seg um, leggur serligan dent á eina miðsavning av bygdini, og hevur tískil fingið heitið. Kollafjørður – Heildarætlan fyri miðstaðarøkið.“

**Lýsing av málinum**
Heildarætlanin greiðir frá, at Kollafjørður er er ein bygd, har virksemið er spjatt millum fleiri øki. Hetta ger, at tað kennist sum um at bygdin hevur ein lutfalsligan leysan býarskipanarligan bygnað.
Hetta gevur bygdini avbjóðingar, men eisini møguleikar. Longdin á bygdini boðar frá einum serstøkum fjølbroytni, har hvør partur av bygdini hevur sín serliga dám og sítt egna eyðkenni.

Tað er ein leypandi avbjóðing, sum liggur í at menna hesar partar hvør sær, og samstundis tryggja, at sambandið har ímillum verður styrkt, soleiðis at bygdin kann virka
sum ein heild. Men ætlanin leggur upp til, at bygdin fyrst og fremst skal mennast frá miðjuni, og at Kollafjørður tískil skal hava ein greiðan savningardepil har dentur verður lagdur á trivnaðin og møguleikar at savnast um ymiskt virksemi, sum kann koma øllum bygdarfólkinum til góðar.

Í skjalinum *Heildarætlan Kollafjørður - 7 marts2025,* j. nr. 25/02604-5 verða ymisk átaksøkir lýst, sum t.d:
- Ein ætlan um eitt trivnaðar- og miðsavningarøki við Sjógv
- Eitt fleirfunktionelt bygdarhús við umskiftiligum møguleikum

- Eitt øki við felagsveltu og bátahyli í Botnánni
- Vælveruøki og sjóbundið trivnaðarøki við bátahylin í Sjógv.
- Eitt nýtt bústaðarøki við Botnánnað við serstakari byggisamtykt
- Ein størri sethúsaútstykking í omanfyri Botnavegin í trimum møguligum byggistigum

Umsitingin metir, at farast kann í gongd við at nágreina arbeiðsátøkini og at leggja eina stigvísa og ítøkiliga arbeiðsætlan so skjótt sum heildarætlanin er samtykt.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Víst verður somuleiðis til mál nr. 25/03549, Framtíðar byggilendi í Kollafirði – 23/02421, har tað er samtykt, at fara í samráðingarnar við eigaran av matr. nr. 159, soleiðis at atkoman til
byggilendið sunnan fyri Botnánna verður tryggjað. Og tá endaliga atkoman til økið sunnan fyri Botnánna er avklárað, at skipanin av økinum verður boðin út til ráðgeva at koma við boð upp á eina alternativa bústaðarbygging í økinum.
Upplýsast skal, at farið verður undir samráðingarnar við eigaran av matr. nr. 159 fyrsta dagin.

Viðmerkjast skal, at náttúruverndar- og friðingarmyndugleikar skulu hoyrast í sambandi við ymsu átøkini, sum t.d. leggja seg tætt at Botnánni. Her verður t.d. hugsað um ætlanina við miðstaðarøkinum við Botnánna.

Eisini eru lendisviðurskifti, har avtalur skulu gerast við lendisánarar fyri at røkka ætlanini um víðkaðu sethúsaútstykkingina í heildarætlanini.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
23/06514 Kollafjørður - Heildarætlan fyri mistaðarøkið.
25/03549 Framtíðar byggilendi í Kollafirði – 23/02421

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Viðmerking frá staðbundnu nevnd í Kollafirði:

> „Fyri bygdina hevur hetta mál allar hægstu raðfesting, tí hetta er grundarlagið undir allari framtíð í bygdini. Bygdin er forsømd í Tórshavnar kommunu og tí vænta nógvir og fjølbroyttir búðstaðir í økinum. Ein ítøkilig og framsøkin búðstaðarætlan eigur at fara í gongd beinanvegin.
>
> - Fólk kunnu eiga ogn og fáa grundstykki
> - Marknaðarprísur
> - Vetrarfriðing
> - Miðstaðarøkið í Kollafirði er fyrstu prioritetur
> - Líðin er annar prioritetur
> - Signabø er triði prioritetur“

**Skjøl**
*Heildarætlan Kollafjørður - 7 marts2025*, j. nr. 25/02604-5
*Kollafjørður – Heildarætlan fyri miðstaðarøkið,* j.nr. 23/06514-1

Kunnað verður um málið í staðbundnu nevndini fyri Kollafjørð.

**Kollafjarðarnevndin 05. mars 2025:** Umrøtt. Staðbundna nevndin í Kollafirði tekur undir við ætlanini.

**Ískoyti**:
Víst verður til omanfyri standandi lýsing av heildarætlanini. Umsitingin mælir til, at heildarætlanin verður samtykt sum eitt vegleiðandi ætlanarskjal fyri framtíðarátøk í Kollafirði.

Kollafjørður hevur tørv á fjølbroyttum bústaðarmøguleikum – og neyðugt er við nøktandi lendi til framtíðar útbyggingarnar av bygdini. Í heildarætlanini verður víst á økið oman fyri og vestan fyri skúlan og læknahølini sum upplagt lendi til framtíðar bústaðarútbyggingar. Í málinum *25/03549, Framtíðar byggilendi í Kollafirði – 23/02421*, er avtalan um lendið oman fyri ítróttarhøllina, matr. nr. 107a.

Fyri veruliga at tryggja framtíðar útbyggingarnar av bygdini, verður mett, at tað er týdningarmikið, at kommunan somuleiðis ognar sær lendið vestan fyri matr. nr. 107a. Talan er um matr. nr. 87, 81a, 85, 86a, 84a og part av matr. nr. 156a. Allir hesir matriklar eru privatogn – og hava fleiri av hesum eigarum vetrarbit í bygdini.

Mett verður ráðiligt at fara í samráðingar við eigararnar av hesum matriklum, soleiðis at framtíðar bústaðarútstykkingar í Kollafirði kunnu tryggjast.

<u>Økið sunnan fyri Botnánna:</u>
Í málinum *25/03549, Framtíðar byggilendi í Kollafirði – 23/02421*, er avtalan um lendið sunnan fyri Botnánna samtykt. Tað er somuleiðis samtykt í hesum málinum, at farast skal undir útstykkingina sunnan fyri Botnánna, tá ein avtala um atkomu til økið fyriliggur. Fleiri møguleikar eru fyri atkomu til økið, og skal umsitingin fara undir samráðing við ymisku eigararnar fyri at fáa atkomuna tryggjaða.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

Enn eru fíggjarligu avleiðingarnar ikki kendar, tí samráðingarnar við ymisku lendiseigararnar ikki eru komnar á mál.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til at:
- samtykkja Heildarætlanina fyri Kollafjørð sum eitt vegleiðandi ætlanarskjal fyri framtíðarátøk í Kollafirði.
- og at beina málið í teknisku nevnd og havnanevndina í sambandi við heildarætlanina, sum eisini røkkur inn á øki, sum vegamyndugleikin og Havnaskrivstovan varða av.
- umsitingini verður heimilað at fara undir samráðingar við eigararnar á traðunum vestan fyri ítróttarhøllina vísandi til tørvin á øki til bústaðarbygging í Kollafirði.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 31. mars 2025:** Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Heðin Mortensen, Anja Weyhe, tekur undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson atkvøða blankt.

**Havnanevndin 01. apríl 2025:** Útsett.

**Havnanevndin 07. apríl 2025:** Samtykt at taka undir við heildarætlanini sum vegleiðandi ætlanarskjal, men at komandi mál, ið viðvíkja havnaøkinum, skulu góðkennast í Tórshavnar havn.

**Fíggjarnevndin 09. apríl 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Høgni Vlihelmsen, tekur undir við havnanevndini og meirilutanum í teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari atkvøðu ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Astrið Breckmann.

Blankt atkvøddu: Annfinn Brekkstein.

# 106/25 Arkitekturpolitikkur fyri Tórshavnar kommunu - 22/05054

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.03.2025 | 41/25 | 25/03681-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.03.2025 | 46/25 | 25/03681-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 83/25 | 25/03681-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 106/25 | 25/03681-1 |

**Upprunin til málið**
Hetta málið er eitt framhald av málinum "Arkitekturpolitikkur fyri Tórshavnar Kommunu" – j.nr. 22/05054. Sí viðheftu upprunamálslýsingina: *Upprunalig málslýsing Arkitekturpolitikkur fyri Tórshavnar Kommunu*, j.nr. 25/03681-5

Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti 7. november 2022 at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini um at fara undir ein Arkitekturpolitikk fyri Tórshavnar kommunu.

Málið hevur ikki verið til viðgerðar á býráðsfundi enn.

Umsitingin er farin í eina arbeiðstilgongd at fyrireika hesa verkætlanina. Tað, sum nú fyriliggur er ein meira ítøkilig arbeiðsætlan, við einum arbeiðssetningi, sum greiðir frá vavinum á verkætlanini og ætlaðu arbeiðstilgongdini framyvir, umframt at ein kostnaðarmeting er gjørd, sum skal samtykkjast.

**Lýsing av málinum**
Nógv ferð er á byggivinnuni, og í miðstaðarøkinum er stórur eftirspurningur og áhugi hjá mennarum, arbeiðstakarum og íleggjarum at byggja, bæði til vinnuna, tað almenna økið umframt tann privata bústaðarmarknaðin.
Fyri hvørt einstakt inntriv og átak, sum verður framt, roynir Tórshavnar kommuna at tryggja, at verkætlanin er í trá við fakliga skynsama býarskipan og eina grundleggjandi hugsjón um ein gott og burðardygt býar- og bygdaumhvørvi fyri borgaran við einum søguliga rótfestum, sterkum og staðbundnum samleika.

Hetta krevur tó nógva orku og nógv samskifti í hvørjum einstøkum føri, og tørvur hevur verið á einum skjali, sum vísast kann til í hesi samskiftistilgongdini. Eini skjalfestari vegleiðandi kunngerð, sum greiðir frá teimum hugsjónum sum kommunan hevur, og við eini ítøkiligari og greiðari kravfesting sum er politiskt samtykt og sostatt lógliga bindandi.

Býarskipanardeildin hjá Tórshavnar kommunu seinastu árini havt eitt ynski um at skjalfesta og almannakunngera ein arkitekturpolitikk, sum er sergjørdur til tørvin og viðurskiftini í Tórshavnar kommunu.
Nevnast kann, at tað er vanligt í londunum kring okkum, at størri kommunur hava egnan arkitekturpolitikk, sum eisini verður nýttur á líknandi hátt.

Ein **arkitekturpolitikkur fyri Tórshavnar kommunu** er sostatt ein bóklingur, sum ítøkiligger og verjir hugsjónina um góða og trygga býar- og bygdamenning í allari kommununi, umframt at hann eisini er kunnandi, kveikjandi og stimbrar tilvitskuna um samleika, huglag og aðrar dygdir í tí bygda og óbygda umhvørvinum í kommununi.

**Arkitekturpolitikkurin** verður ein bóklingur undir **Kommunuætlanini**.
Hann skal fevna um alla kommununa, og verður dagførdur 5 hvørt ár, ella eftir tørvi.

Endamálið er at tryggja:

- At vísast kann til eina greiða og langskygda býarskipanarliga og arkitektoniska hugsjón um hvussu Tórshavnar kommuna skal mennast í býi, á bygd, og í náttúruni.

- At lunnar verða lagdir undir eina savnandi mentan, eitt fólksligt samskifti og eina felags tilvitsku um býarskipanarliga dygd og arkitektoniskt virði, søgu, arv, samleika og staðbundni.

- At mennarar, arbeiðstakarar, og borgarar, hava greiðari ynskir og bindandi kravfestingar at taka atlit til tá verkætlanir verða framdar í tí bygda umhvørvinum og í náttúruni.

- At fleiri ymsar deildir og umsitingarøkir hjá Tórshavnar kommunu, so sum byggimálsdeild, tekniska deild, mentamáladeild og Tórshavnar Havn lætt kunnu taka atlit, gera tilvísingar, og gagnnýta skjalið sum ein amboðskassa í teirra arbeiði.

- At verandi politiska skipan og komandi skipan, hava eina greiða langskygda ætlan at taka atlit til. Og at tað er lætt at kunna seg um tær fakligu grundgevingarnar, og tey ástøðiligu akkersfestini sum vera borðin fram í skjalinum, sum kunnu vera viðkomandi í raðfestingararbeiðinum og í nevndarviðgerðini av einum máli.

- At serlig eyðkenni, so sum søguligir bygningar, serlig býarrúm, og sermerkt býarskipanarlig brøgd í Tórshavnar kommunu fáa eina størri viðurkenning og virðismeting.

**Verkætlanin**
Ætlanin er at lidna uppskotið Arkitekturpolitikkur fyri Tórshavnar kommunu verður lagt fyri býráðið, umvegis viðkomandi politiskar nevndir, seint á heysti 2025.

Í viðhefta arbeiðssetninginum verður greitt frá hvussu verkætlanin og arbeiðsgongdin er uppbygd.

Sí viðheftu skjølini:
*Uppskot um arbeiðssetning - Arkitekturpolitikkur fyri TK 28feb2025*, j. Nr. 25/0368-2
*Ætlað verkætlanartilgond - Arkitekturpolitikkur 28feb2025*, j.nr. Nr. 25/0368-3

Í stuttum kann sigast, at verkætlanin verður deild upp í fylgjandi arbeiðsstig:

A. Fyrireikingarstig

B. Miðling, kveiking og orðaskifti

    Hetta er m.a. við átøkum á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu, myndakapping,

    einum átaksfilmi, borgaraluttøku við fyrilestrum og temadøgum.

C. Tilfarsviðgerð og innanhýsis kjakupprit

D. Almenn borgarahoyring og nevndarviðgerð av lidna skjalinum

E. Eftirviðgerð og leypandi dagføringar

Við ætlaðum miðlaátøkum, borgaraluttøkutilgongd við fyrilestrum og temadøgum og øðrum verður verkætlanin mett at kosta kr. 500.000.

Sí viðheft skjal: *kostnaðarmeting Arkitekturpolitikkur dagf28feb2025*, j.nr. Nr. 25/0368-4

| Býráðsfundur<br>24. april 2025 | Blað nr.: 277 |
|---|---|
| | Forkvinnunnar merki: |

**Ábyrgd og fyrisiting**
Áðrenn endaligu viðgerðina av lidna uppskotinum um Arkitekturpolitikkinum í Býráðnum, verða býráðslimirnir settir inn í tilfarið við eini gjøllari gjøgnumgongd, har greitt verður frá tilgongdini og møguligum viðkomandi mótmælum og viðmerkingum, sum hava verið.

Tá arkitekturpolitikkurin er samtyktur, hevur Býráðið yvirskipaðu ábyrgdina av arkitekturpolitikkinum, og ímeðan fyrisitingarliga ábyrgdin liggur hjá býararkitektinum. Eftirfylgjandi fyrispurningar og viðmerkingar um innihaldið í Arkitekturpolitikkinum verða beind til býararkitektin at svara.

Eins og við kommunuæltanini hevur býráðið skyldu til at taka atlit arkitekturpolitikkin tá politiskar avgerðir verða tiknar.

Um tørvur er á politiskum metingum av innihaldinum, kósabroytingum, ella tá avgerðir skulu takast millum ymisk áhugamál, sum stríða móti hvørjum øðrum, skal Býararkitekturin og býarskipanardeildin koma við einum tilmæli.

Býararkitekturin, er sostatt fyrisitingarligur ábyrgdari av arkitekturpolitikkinum og av miðlaátøkunum kring verkætlanina. Í sambandi við skrivingina av Arkitekturpolitikkinum, setur Býarkitekturin ein fakligan verkætlanarbólk á deild sínari (Býarskipanardeildini) at arbeiða við verkætlanini dagliga, og at leiða hana á mál.

**Skjøl**
*Uppskot um arbeiðssetning - Arkitekturpolitikkur fyri TK 28feb2025*, j. Nr. 25/0368-2
*Ætlað verkætlanartilgond - Arkitekturpolitikkur 28feb2025*, j.nr. Nr. 25/0368-3
*kostnaðarmeting Arkitekturpolitikkur dagf28feb2025*, j.nr. Nr. 25/0368-4
*Upprunalig málslýsing Arkitekturpolitikkur fyri Tórshavnar Kommunu*, j.nr. 25/03681-5

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

Hetta málið er eitt framhald av málinum "Arkitekturpolitikkur fyri Tórshavnar Kommunu" – j.nr. 22/05054

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | x | x | x | x |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6275 | LK62999 | Fríðkan av býnum |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 6275 | | | Arkitekturpolitikkur |

| **Upphædd** |
|---|
| 500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| | **Býráðsfundur**<br>24. april 2025 | Blað nr.: 278<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 500.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | - |

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til, at samtykkja viðhefta arbeiðssetning sum leist til framhaldandi tilgongdina, og at játta 500.000 kr av konto 6275, LK62999, Fríðkan av býnum á nýggja verkætlan við heitinum Arkitekturpolitikkur, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðið verður mett sum umsitingarligt arbeiðið, og tískil skal játtanin somuleiðis játtast sum eykajáttan til fyrisitingina.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | LK62999 | Fríðkan av býnum | 1313 | Sak | Arkitekturpolitikkur | | 500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 500.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | - |

Tilmæli:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at samtykkja viðhefta arbeiðssetning sum leist til framhaldandi tilgongdina, og at játta sum eykajáttan 500.000 kr av konto 6275, LK62999, Fríðkan av býnum á kt. 1313 við undirliggjandi sak, Arkitekturpolitikkur, og at beina málið tvær ferðir í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Fíggjarnevndin 19. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Einmælt samtykt.

# 107/25 Útskiftan og umvælingar á Brennistøðini í 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 31.03.2025 | 25/25 | 25/04245-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.04.2025 | 73/25 | 25/04245-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 107/25 | 25/04245-1 |

**Upprunin til málið**
Neyðug útskiftan og umvælingar á kommunalu Brennistøðini, sum skal gerast í 2025.

**Lýsing av málinum**
Á vári í 2024 var Rambøll biðin um at gera eina støðulýsing av Brennistøðini, har arbeiðssetningurin var:

1. Hvat skal gerast, fyri at Brennistøðin kann koyra í 10 ár afturat, fram til 31-12-2034
2. Tíðarætlan fyri nær tey ymisku arbeiðini skulu gerast
3. Kostnaðarmeting fyri tey arbeiði, sum skulu gerast

Í oktober 2024 fingu vit eina støðulýsing (hjáløgd), sum vísir, at fyri at Brennistøðin skal koyra trygt og undir galdandi reglum í 10 ár afturat, skulu útskiftingar, umvælingar og annað gerast fyri íalt kr. 36.100.000. Tá er keyp av Schreddara fyri kr. 3.000.000 við.

Vit hava keypt ein Schreddara, so samlaði fíggjartørvurin er kr. 33.100.000.

Tíðarætlanini, sum Rambøll hevur sett upp, vísir, at fíggingingin eigur at verða játtað soleiðis:
- Í 2025 kr. 20.750.000
- Í 2026 kr. 8.850.000
- Í 2027 kr. 2.750.000
- Í 2028 kr. 750.000

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Biðið verður um at fáa kr. 10.000.000 av løgukontu 7175, Renovatión (íløgur), í 2025, til at gera útskiftingar og umvælingar á Kommunalu Brennistøðini, sambært støðulýsing frá Rambøll.

Játtanin á hesi kontu fyri 2025 er íalt kr, 13.000.000, harafturat standa kr. 2.159.000 frá 2024, sum ikki eru brúktar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
j.nr. 24/07230 Støðulýsing av Brennistøðini 2024, sum hevur verið fyri í Náttúru- og Umhvørvisnevndini 2 ferðir til kunningar.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
25/04245-2 Støðulýsing frá Rambøll

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| **Býráðsfundur**<br>24. april 2025 | Blað nr.: 281 |
|---|---|
| | Forkvinnunnar merki: |

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 7175 | LK71999 | Renovatión | 7175 | | Útskiftingar og umvælingar á Kommunalu Brennistøðini | | 10.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á Umhvørvisdeildini og leiðarin á Brennistøðini mæla til, at játtaðar verða kr. 10.000.000,00 av løgukontu LK71999 Renovatión (íløgur), inn á nýggja verkætlan, Útskiftingar og umvælingar á Kommunalu Brennistøðini, bæði undir kt. 7175, til at gera útskiftingar og umvælingar á Kommunalu Brennistøðini, sambært støðulýsing frá Rambøll og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 31. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. apríl 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá Náttúru- og umhvørvisnevndini við tí treyt, at endalig góðkenning av ítøkiligum íløgum innanfyri játtanina skal fáast til vega frá fíggjarnevndini, tá ið kostnaðurin er kendur. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri ongari blankari atkvøðu og einari atkvøðu ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Annfinn Brekkstein, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Astrið Breckmann.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

# 108/25 Skipan av virkseminum á Hjalla og á Sundi - 24/01098

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 31.03.2025 | 24/25 | 25/00167-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.04.2025 | 75/25 | 25/00167-1 |
| 3 Kaldbaksnevndin | 26.05.2025 | 18/25 | 25/00167-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 108/25 | 25/00167-1 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við ynski um at endurskoða burturkastøkið í Tórshavnar kommunu, hevur umsitingin gjørt eitt uppskot til framtíðarætlan fyri burturkastøkið, har ein partur av virkseminum á Hjalla verður fluttur inn á Sund, og har ein stórur partur av økinum á Hjalla skal brúkast til endurnýtslu og endurvinning.

**Lýsing av málinum**
Víst verður til frágreiðing jnr. 24/01098-2, sum er uppskot til broytingar á burturkastøkinum. Í hesi frágreiðing er ein nærri lýsing av málinum.

Ætlanin er at umskipa økið, soleiðis at bilar, jarn, dekk, rottangabilar, slammbilur og øki til Politiið at seta upptiknar bilar inn á, verður alt flutt inn á økið á Sundi, sunnari partur. Økið má gerast klárt og innrættast til endamálið.

Í sambandi við leigu av økinum á Sundi verður víst til mál j.nr. 24/01097, har Havnanevndin tann 16. apríl 2024 og fíggjarnevndin tann 23. apríl 2024 hava samtykt at taka undir við at flyta part av virkseminum hjá Brennistøðini inn á Sund. Málið skal leggjast fyri Havnanevndina, fíggjarnevndina og býráðið í sambandi við leigusáttmála, tá kostnaður fyriliggur.

Økið á Hjalla verður síðani býtt upp í 4 partar, tað er:
1. Endurnýtslupláss (vestan fyri brennistøðina, har jarnplássið er)
2. Brennistøð
3. Móttøkupláss (tað sum í dag er endurnýtslan eystan fyri brennistøðina)
4. Víðkan av móttøkuplássinum eystureftir (ikki útgrivið)

Nærri lýsing av økjunum er í frágreiðingini.

Mánadagin tann 24. februar 2025 var framløga fyri øllum býráðslimum á Hotel Hafnia, har ætlanin varð løgd fram.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ætlanin er at arbeiða víðari við hugskotsætlanini og at fáa gjørt eina byggiskrá og prosjektuppskot, soleiðis at farast kann undir at prosjektera, gera útbjóðingartilfar og bjóða arbeiðini út, umframt at fáa øll loyvir upp á pláss.

Neyðugt er eisini at gera tilfar, sum kann nýtast til at kunna staðbundnu nevndina í Kaldbak og fólk sum búgva í Kaldbak.

| | Býráðsfundur<br>24. april 2025 | Blað nr.: 283<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

Av tí at talan er um eitt so stórt og umfatandi arbeiði, verður neyðugt at brúka uttanhýsis ráðgevar til ymiskar uppgávur.

Ætlanin er at skipa arbeiðið soleiðis:
1) Settur verður ein stýrisbólkur (Borgarstjórin setir bólkin)
2) Settur verður ein verkætlanarleiðari (Bygningsdeildin)
3) Settur verður ein arbeiðsbólkur, at gera útgreiningar o.a.
4) Neyðug uttanhýsis ráðgeving

Biðið verður um at fáa kr. 1.550.000 av løgukontu 7175 í 2025, til at gera byggiskrá og annað fyri.

Játtanin á løgukonto 7175 fyri 2025 er íalt kr. 13.000.000,00, harafturat standa kr. 2.159.000 frá 2024, sum ikki eru brúktar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
24/01097 Leiga av øki á Sundi
25/03238 Raðfestingar á løgukonto 7175 Renovasjón - 2025

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
jnr. 25/03238-5 Framløga um burturkastøkið (frá kunningarfundinum tann 24. februar 2025).
jnr. 24/01098-2 Uppskot til broytingar á burturkastøkinum.
jnr. 24/01098-6 Brennistøðin, tíðarætlan

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 7175 | LK71999 | Renovatión | 7175 | | Virksemið á Sundi og á Hjalla | | 1.550.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á umhvørvisdeildini og leiðarin á Brennistøðini mæla til, at játtaðar verða kr. 1.550.000 av løgukarminum LK71999 Renovation inn á nýggja verkætlan, Virksemið á Sundi og á Hjalla, undir kt. 7175, til at gera útgreiningar, byggiskrá og annað, og beina málið í býráðið umvegis fíggjanevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 31. mars 2025:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Annita á Fríðriksmørk, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Kári Johansen, tekur støðu á seinni fundi, tá ið meiri nágreiniligt tilfar, ið hoyrir til málið frá áðrenn 01.01.2025, fyriliggur at taka støðu til.

**Fíggjarnevndin 09. apríl 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við tilmælinum frá Náttúru- og umhvørvisnevndini og beinir málið í býráðið við teirri viðmerking, at tá ið tilfarið fyriliggur verður tað sent til hoyringar hjá staðbundnu nevndini, Kaldbaksnevndini.

Tróndur Sigurðsson, mælir til at útseta málið til tess at hoyra staðbundnu nevndina, Kaldbaksnevndina, áðrenn peningur verður brúktur til verkætlanina.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Atkvøtt varð um uppskot frá Kára Johansen um at beina málið aftur í nevnd. Uppskotið fall við fimm atkvøðum fyri, átta atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Astrið Breckmann.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála.

Síðani varð atkvøtt um uppskot frá Trónda Sigurðsson um at hoyra staðbundnu nevndina, Kaldbaksnevndina, áðrenn peningur verður brúktur til verkætlanina.

Uppskotið fall við fimm atkvøðum fyri, átta atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Astrið Breckmann.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við tíggju atkvøðum fyri, trimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen og Astrið Breckmann.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

# 109/25 Ymisk arbeiði á Brennistøðini í 2025 - fíggjað av løgukonto 7175 renovasjón

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 31.03.2025 | 26/25 | 25/04246-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.04.2025 | 74/25 | 25/04246-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 109/25 | 25/04246-1 |

**Upprunin til málið**
Tað eru ymisk arbeiðir sum skulu gerast á Brennistøðini, sum ikki kunnu fíggjast av verandi rakstri og tí krevja tey eykajáttan.

**Lýsing av málinum**
Ætlanin er at fáa niðanfyri nevndu arbeiðir/veitingar fíggjaði av løgukonto 7175 Renovasjón, fyri árið 2025. Av tí at talan er um "smærri íløgur", verður søkt um at fáa løgujáttan flutta yvir á rakstur á konto 7110.

Á løgukontu 7175 eru játtaðar íalt kr. 13 mió. í 2025, umframt at kr. 2.159 mió. standa frá 2024, sum ikki eru brúktar.

Umsitingin mælir til, at játtaðar verða íalt kr. 1.845.000 av íløgukonto 7175 Renovasjón, at flyta yvir á rakstrarkonto 7110 Renovatión, at nýta soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| Nýggjar bingjur | kr. | 500.000 |
| Moldplássið í Havn | kr. | 1.000.000 |
| Umskipa plássið á endurnýtsluni | kr. | 345.000 |

*Ætlanin er eisini at fáa eina nýggja stýrisskipan til alt renovasjónsøki. Endamálið við skipanini er, at fáa betri fakturering, betri tænastur, hjálp til ruskinsavning og rottangatøming, umframt betri arbeiðsgongdir yvirhøvur, soleiðis at vit fara frá at alt er manuelt, til at alt verður automatiserað og kann tosa saman. Við nýggjari skipan, koma inntøkurnar eisini at vaksa, av tí at onki dettur niður ímillum.*

*Arbeitt verður víðari við hesum og tá vit kenna kostnaðin, verður málið lagt fyri nevnd.*

**Lógir, ásetingar**

**Lógir, ásetingar o.a.**
Sambært játtanarreglurnar hjá Tórshavnar kommunu, so skulu 2 viðgerðir í býráðnum til fyri at flyta millum íløgur og rakstur.

**Upplýsingar frá umsitingini**

<u>Bingjur:</u>
Ætlanin er at keypa 4-5 nýggjar bingjur.
Bingjurnar, sum ætlanin er at keypa, eru tvær spíssbingjur, at brúkta í Nólsoy, soleiðis at ruskbilurin kann tøma tær, tá hann er í Nólsoy eina ferð um vikuna. Tvær bingjur við lúkum, tað eru bingjurnar, sum eru á plássinum hjá okkum á Hjalla, hesar bingjur eru sera nógv slitnar. Og tvær opnar bingjur til timbur, hesar verða eisini brúktar á plássinum á Hjalla.

<u>Moldplássið í Havn:</u>
Kommunan hevur moldpláss í Húsahaga. Moldplássið liggur sunnan fyri vegin inn til Vatnverkið og tyrvingarplássið í Villingadali, sum ikki er í nýtslu meira.
Við tyrvingarplássið stendur ein gamal skúrur, innrættaður til skrivstovu og starvsfólkarúm, umframt ein høll til amboð. Skúrurin og høllin eru í so ringum standi, at hesi eiga at verða tikin niður og beind burtur. Tað ber ikki til at endurnýta skúrin og høllina við at flyta tey til eitt annað stað.
Nú øll tyrvingin er flutt til Kvívíkar, verður ikki meira tyrvt í Húsahaga, og tí er bert moldplássið eftir í rakstri, og tað liggur uml. 1,7 km. burtur frá verandi skúri, um koyrt verður eftir vegnum, ella 1 km. í beinari luftlinju.
Tað eru 2 gravimaskinur á staðnum og 2 mans arbeiða har, annar á moldplássinum og hin á tyrvingarplássinum, har plássið verður avriggað.
Neyðugt er at seta ein nýggjan skúr upp við moldplássið, sum inniheldur skrivstovu og starvsfólkarúm. Stoypast má eitt fundament, og leiðingar mugu leggjast til skúrin.

<u>Umskipa pláss á endurnýtsluni:</u>
Verandi endurnýtsla er ov lítil í mun til talið av borgarum/bilum, sum koma inn har. Serliga er tað nógv ferðsla leygardagar, tá tað koma upp til 1.500 bilar inn. Um summarið eru tað nógv, sum koma niðan við urtagarðsburturkasti (gras, greinar o.a.), og fleiri av hesum koma við viðfestivogni.
Sum er, fyllast bingjurnar til urtagarðsburturkast rættuliga skjótt, og plássið er soleiðis innrættað, at fólk sum koma inn við viðfestivogni, mugu bakka fyri at sleppa avstað aftur, og tað duga tey illa. Tí kemur ofta proppur í, og plássið fyllist við bilum.
Fyri at bøta um hetta, er ætlanin at gera eitt nýtt pláss til urtagarðsburturkast, sum tekur nógv meira, og har bilar við viðfestivogni sleppa til og frá undan at bakka (hjálagt er tekning).

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
25/03238-4 Tekning av plássi til urtagarðsburturkast.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 7175 | LK71999 | Renovatión |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 7110 | | Renovatión | |

| **Upphædd** |
|---|
| 1.845.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin, leiðarin á Umhvørvisdeildini og leiðarin á Brennistøðini mæla til, at játtaðar verða kr. 1.845.000 av íløgukonto 7175 Renovasjón, at flyta yvir á rakstrarkonto 7110 Renovatión og at beina málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 31. mars 2025:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Annita á Fríðriksmørk, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Kári Johansen, tekur ikki undir við, at pengar verða fluttir av íløgum inn á rakstur.

**Fíggjarnevndin 09. apríl 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála, tekur undir við tilmælinum frá Náttúru- og umhvørvisnevndini, og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við málinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Astrið Breckmann.

## 110/25 Broyting í almennu byggisamtyktini – US krevur serstaka byggisamtykt ísmbv. sundurbýti av matriklum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 31.03.2025 | 59/25 | 25/00949-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 110/25 | 25/00949-1 |

**Upprunin til málið**
Hetta málið er eitt framhald av mál nr 24/03527.

Franciskanarasystrarnar niðurleggja virksemi sítt í Føroyum og skulu avhenda fastognir teirra. Í hesum sambandi skal Mariukirkjan latast katólska kirkjuliðinum í Føroyum. Í dag stendur kirkjan í parti av matr. nr. 779a, eins og annar bygningur (kleystrið), í umráðisparti D3, sum er ætlaður almennum stovnum, skúlaskapi o.t. (sí skjalið *kort av økinum*).

Matrikulstovan hevur noktað at sundurbýta matr. 779a, uttan so at serstøk byggisamtykt verður gjørd, samsvarandi við ásetingarnar í § 20, stk. 2 í almennu byggisamtyktini, sum fyri D3 økir ásetir, at “Útstykking og bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki."

**Lýsing av málinum**
Býráðið samtykti á fundi 19. september 2024 at broyta almennu byggisamtyktina, soleiðis at tað ikki var neyðugt við serstakari byggisamtykt, tá matriklar skulu sundurbýtast ella samanleggjast, men áðrenn broytingaruppskotið skuldi leggjast til almenna hoyring, umrøddi umsitingin málið og gjørdist varug við møguligar ótilætlaðar avleiðingar, í fall sundurbýtan av øllum matriklum í kommununi ikki longur krevur serstaka byggisamtykt.

Í ávísum førum kann møguligt framtíðar byggilendi í kommununi sundurbýtast og mennast uttan góðkenda heildarætlan, og kann hugsast, at atlit tí ikki verður tikið til samlaðu skipanina av økinum, harímillum vegaviðurskifti og fríøkir osfr.

Ítøkilig dømi um mál at sundurbýta, sum fella undir omanfyri nevndu viðurskifti eru:
- Mál nr. 22/05642, Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 1122a, Tórshavn
- Mál nr. 24/00274, Umsókn um sundurbýti matr. nr. 1114a, Tórshavn.

Í báðum hesum málum hevur byggi- og býarskipanarnevndin samtykt at viðmæla sundurbýti, treytað av at tinglisið verður á allar ognirnar frá verandi matr.nr., at áðrenn nakað kann verða bygt á hesar ognir, so skal ein av kommununi góðkend útstykkingarætlan og møgulig serstøk byggisamtykt fyriliggja, og at kommunan hevur átalurætt.

Umhvørvisstovan ynskir ikki at viðgera málini um sundurbýtið við omanfyri nevndu treytum, men krevur at serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri hesi økir, áðrenn sundurbýtið kann fremjast.

Umsitingin er samd um, at tað er týdningarmikið at tryggja, at hesi framtíðar byggilendi verða skipað í síni heild, og ikki verða sundurbýtt, soleiðis at ein framtíðar heildarbygging á lendinum ikki verður møgulig. Og tá Umhvørvisstovan ikki vil góðkenna sundurbýtið við tinglisnum treytum, so er týdningarmikið at verja okkara framtíðar byggilendi og ikki loyva øllum sundurbýtum uttan treytir.

Av hesi orsøk er neyðugt at nágreina broytingina, soleiðis at almenna byggisamtyktin loyvir sundurbýti/samanlegging av matriklum, sum ikki hava stórvegis býarskipanarliga ávirkan, men hinvegin varðveitir kravið um serstakar byggisamtyktir, tá ið sundurbýti/samanlegging fer fram við størri ávirkan, eitt nú tá ið óbygt framtíðar byggilendi skal skipast.

Hetta kann gerast við at broyta tey 9 brotini í almennu byggisamtyktini, har tað í dag stendur:

*"Útstykking verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki."*

Soleiðis at tað ístaðin fyri framyvir stendur:

> Útstykking verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki. **<u>Henda áseting er ikki galdandi fyri sundurbýti og samanlegging av matriklum, um øki er bygt og um broytingin ikki viðførir stórvegis broytingar fyri nýtsluna í økinum"</u>**

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
- *Almenna byggisamtyktin eftir broyting – Rættað*, journal nr. 24/06485-12.
- *Kort av økinum,* journal nr. 24/06485-6

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta almennu byggisamtyktina sambært skjalinum, *Almenna byggisamtyktin eftir broyting - Rættað*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Annfinn Brekkstein, Høgni Vilhelmsen og Astrið Breckmann.

Ímóti atkvøddu: Kári Johansen og Tróndur Sigurðsson.

## 111/25 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.02.2025 | 30/25 | 25/01104-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 63/25 | 25/01104-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 31.03.2025 | 60/25 | 25/01104-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 111/25 | 25/01104-1 |

**Samanumtøka av málinum**
Hetta málið er eitt framhald av málinum Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað (21/03382), sí skjalið *Upprunaliga málið – Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað*.

Í 2020 varð samtykt at endurskoða byggisamtyktirnar fyri allar bygdirnar í kommununi (20/04243). Upprunaliga var ætlanin at endurskoða tær galdandi serstøku byggisamtyktirnar, sum í fleiri førum ikki hava verið endurskoðaðar síðani kommunusamanlegging.

Endamálið er at broyta ásetingar, soleiðis at tær bæði samsvara betri millum bygdirnar í kommununi (javnseta bygdirnar) og við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu, harafturat verður í ávísum førum viðmælt at tillaga byggisamtyktarmørk. Á hendan hátt er tað bæði lættari at skilja og umsita byggisamtyktirnar fyri bygdirnar í kommununi.

Fyrsta uppskotið um at endurskoða serstøku byggisamtyktina fyri Velbastað varð samtykt 28. oktober 2021 og lá til almenna hoyring  millum 1. nov. 2021 til 13. des. 2021. Kommunan móttók 3 mótmælir og mælti umsitingin frá at ganga teimum á møti.

Málið varð samtykt og síðani sent landsmyndugleika til góðkenningar. Í skrivi frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, dagfest 27. september 2022, verður heitt á kommununa, at bygdirnar í Tórshavnar kommunu framyvir vera reguleraðar í almennu byggisamtyktini, ella við hvør sínari almennari byggisamtykt. Umsitingin hevur síðani gjørt uppskot um almenna byggisamtykt fyri Velbastað, sí skjal *Almenna byggisamtyktin – Velbastaður, rættað*.

**Lýsing av málinum**
Uppskotið varð samtykt í byggi- og býarskipanarvendini 12 februar í 2024, men varð av misgáum ikki lagt aftur fyri Velbastaðnevndini fyrr enn í desember 2024. Umsitingin sendi tilfarið umvegis teldupost og Velbastaðnevndin hevði hesar viðmerkingar:

**Viðmerkingar frá velbastaðarnevndini:**

*Málið hevur verið fyri hjá okkum fyrr, og kunnu vit vísa til tær viðmerkingar sum eru gjørdar tá. Eisini hava vit hesar viðmerkingar at leggja afturat:*

1) *Vit ynskja at hetta málið verður viðgjørt eins og málið í Kirkjubø. Málið á Velbastað er sent til staðbundnu nevndina, meðan í Kirkjubø er sent til almenna hoyring.*
2) *Rættast hevði verið við einari almennari kunning í báðum bygdunum.*
3) *Í nýggju byggisamtyktini hevur man broytt økið F (Almenn fríøki) til D2 (Almennir stovnar og mentan). At taka fríøki úr samtyktini ger, at tú hevur møguleika at byggja á hesum økjum, og sostatt eru ongi almenn fríøki á Velbastað. Hesum mótmæla vit.*
4) *Í fleiri av ásetingunum verður orðingin «og tílíkt» nýtt, og meta vit at hetta er óheppið, tá tað hetta kann boyggjast og vendast, alt eftir hvørji áhugamálini eru.*

Umsitingin svaraði Velbastaðnevndini 16. desember 2024.

*Til 1 og 2:*
*Málið verður eftir ætlan lagt fyri býráðið í januar 2025, og fer síðani, eins og endurskoðanin av Kirkjubø, út til almenna hoyring í minst 6 vikur. Í hoyringstíðarskeiðnum er ætlanin at umsitingin leggur uppskotið fram, og borgarar fáa høvið at spyrja inn til og viðmerkja málið, á kunnandi borgarafundi í Velbastað.*

*Til 3:*
*Hesa viðmerking ynskja vit at fáa lýsta nærri, tí sambært viðmerkingini verður øki F í verandi byggisamtykt lagt til almenn fríøki, meðan verandi byggisamtykt lýsir F sum alment frítíðarøki (ítróttarvøllir, spæliplláss útiveruplláss o.t.).*
*Sambært uppskotinum kemur D2 ístaðin fyri bæði E (almennir stovnar) og F (almenn frítíðarøki), og metir umsitingin at D2 (almennir stovnar og mentan) rúmar bæði endamál.*

*Til 4:*
*Orðingin "og tílíkt" er afturvendandi fyri allar almennu byggisamtyktirnar í Tórshavnar kommunu, umframt galdandi byggisamtykt fyri Velbstað og Kirkjubø. Endamálið er at avmarkað talið av økispørtum og at varðveita ein ávísan fleksibilitet í umsitingini, sum kann vera ein fyrimunur bæði í samband við byggimálsviðger og fyri menning av bygdini. Tað er tó lætt at ímynda sær at orðingin verður brúkt til at fevna um nýtslu, sum ikki hóskar, og verður viðmerkingin tikin til eftirtektar.*

Umsitingin mælir til at leggja uppskotið, sum lýst í hesum málinum fyri býráðið og síðani til almenna hoyring.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í málinum 25/00818, verður mælt til at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 50ø, Velbastaður, frá E (almennir stovnar) til B (sethús) sambært galdandi serstøku byggisamtykt. Hetta er í sambandi við at frískúlin niðurleggur virksemið, og ynskið er at selja ognina.

Sambært uppskotinum um endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað, verður matr. 50ø broyttur frá E øki til D2 økið (almennir stovnar), og tískil kemur hetta ikki at samsvara við tilmælið í máli 25/00818, um broytingin til sethús verður góðkend.

Umsitingin mælir til, at atlit verður tikið til mál nr 25/00818, soleiðis at tilfarið sum verður sent til endaliga viðgerð, annaðhvørt lýsir matr. nr 50ø sum A bústaðarøki ella sum E almennir stovnar, treytað av endaligu viðgerðini av máli nr 25/00818.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað,* journal nr. 21/03382
- *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar,* journal nr. 20/04243
- *Fyrispurningur um broyting av byggisamtykt, galdandi fyri matr. nr. 50ø, Velbastaður - 24/08611,* journal nr. 25/00818

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- *Almenna byggisamtyktin – Velbastaður, rættað,* journal nr. 25/01104-2.
- *Kort – áðrenn broyting,* journal nr. 25/01104-2
- *Kort – eftir broyting,* journal nr. 25/01104-2.
- *Velbastað – áðrenn og eftir– Tekstur,* journal nr. 25/01104-2.

- *Upprunaliga málið – Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað,* journal nr. 25/01104-4

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað sambært skjølunum *Almenna byggisamtyktin – Velbastaður, rættað* og *Kort – eftir broyting*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Atkvøtt varð um uppskot frá Tróndi Sigurðsson um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina.

Uppskotið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

**Viðmerkingar frá Kirkjubøar/Velbastaðarnevndini:**

*Viðmerkingar til mál 21/03382. Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað.*

*Málið hevur verið fyri hjá okkum fyrr, og kunnu vit vísa til tær viðmerkingar sum eru gjørdar tá. Eisini hava vit hesar viðmerkingar at leggja afturat:*

*1) Vit ynskja at hetta málið verður viðgjørt eins og málið í Kirkjubø. Málið á Velbastað er sent til staðbundnu nevndina, meðan í Kirkjubø er sent til almenna hoyring.*

*2) Rættast hevði verið við einari almennari kunning í báðum bygdunum.*

*3) Í nýggju byggisamtyktini hevur man broytt økið F (Almenn fríøki) til D2 (Almennir stovnar og mentan). At taka fríøki úr samtyktini ger, at tú hevur møguleika at byggja á hesum økjum, og sostatt eru ongi almenn fríøki á Velbastað. Hesum mótmæla vit.*

*4) Í fleiri av ásetingunum verður orðingin «og tílíkt» nýtt, og meta vit at hetta er óheppið, tá tað hetta kann boyggjast og vendast, alt eftir hvørji áhugamálini eru.*

Á býráðsfundinum 27. februar 2025 gjørdu býráðslimir vart við viðmerkingarnar frá staðbundnu nevndini, og ivamál var, um byggi- og býarskipanarnevndin hevði tikið viðmerkingarnar til eftirtektar. Víst verður til viðmerkingarnar omanfyri.

Býráðslimir mettu, at av tí at talan er um ógreið viðurskiftir og stórar prinsipiellar broytingar, so var best, at uppskotið varð dagført samsvarandi viðmerkingunum frá staðbundnu nevndini, og at uppskotið harvið verður meira klárt, áðrenn uppskotið verður lagt til almenna hoyring.

Umsitingin ásannar, at broytingar av galdandi byggisamtykt krevja gjølla viðgerð, harímillum móttiknu viðmerkingarnar frá staðbundnu nevndini. Umsitingin viðmælir tó, at verandi uppskot, sum er lýst í hesum málinum, verður lagt fyri býráðið og síðani til almenna hoyring. Í hoyringstíðarskeiðnum verður almennur borgarafundur fyriskipaður á Velbastað, soleiðis at borgarar kunnu fáa neyðugt innlit í málið, og síðani viðmerkja. Á henda hátt verður møguleiki at samla so nógvar viðmerkingar og sjónarmið sum gjørligt, áðrenn endaliga viðgerðin av málinum verður gjørd og møguligar dagføringar av uppskotinum verða gjørdar.

Hetta er sami leistur, sum hevur verið nýttur í sambandi við endurskoðanina av byggisamtyktunum fyri Kirkjubø, Nólsoy, Hvítanes og Kaldbak.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað sambært skjølunum *Almenna byggisamtyktin – Velbastaður, rættað* og *Kort – eftir broyting*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Einmælt samtykt.

# 112/25 Framflytingar fyri roknskaparárið 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.03.2025 | 57/25 | 25/03985-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 89/25 | 25/03985-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 24.04.2025 | 84/25 | 25/03985-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 112/25 | 25/03985-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært játtanarreglunum hjá Tórshavnar kommunu verða meir- og minninýtslur fluttar fram til komandi ár. Framflytingar skulu játtast sum eykajáttan í býráðnum, tvs. Skulu hava tvær viðgerðir.

Meirnýtsla, sum í mesta lagi kann vera 5% av nettojáttanini, verður flutt til næsta ár. Meirnýtsla skal vera burtur innan trý ár.

Minninýtsla, sum í mesta lagi kann vera 10% av nettojáttanini, verður flutt til næsta ár. Um serlig viðurskifti gera seg galdandi, og ynski er at flyta meira enn 10% til árið eftir, kann ein umbøn um hetta sendast avvarðandi fyrisitingarstjóra.

**Lýsing av málinum**
Ársroknskapurin fyri 2024 er gjørdur upp, og gjørt er eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta fram til 2025.

Samlaða framflytingin íroknað Tórshavnar Havn er fyri rakstur 3,4 mió. kr. netto og fyri íløgur 122,9 mió. kr., í alt 126,3 mió. kr., og er útgreinað soleiðis:

| | **Rakstur** | **Íløgur** |
|---|---|---|
| TK | -2,8 mió | 79,5 mió |
| TH | 6,2 mió | 43,4 mió |
| **Íalt** | **3,4 mió** | **122,9 mió** |

Samlaða meirnýtslan á rakstrarsíðuni fyri Tórshavnar kommunu frároknað Tórshavnar havn er -2,8 mió. kr. Á § 1,2 og 4 er talan um minninýtslu, í meðan tað á § 3,5,6 og 7 er talan um meirnýtslu.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>24. april 2025 | Blað nr.: 296 |
| | | Forkvinnunnar merki: |

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| Ymis kar | | Framflutt 2024 |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| Ymis kar | | Játtan 2025 | |

| **Upphædd** |
|---|
| 126,3 mió |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til at játtað framflyting á 3,4 mió. kr. til rakstur og 122,9 mió. kr. til íløgur. Møguligar broytingar í framflytingini koma við til aðru viðgerð.

**Fíggjarnevndin 19. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Einmælt samtykt við fyrst viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Roknskapurin er nú endaligur og staðfest er ein broyting í rakstri.
Samlaða framflytingin íroknað Tórshavnar Havn fyri rakstur verður 1,8 mió. kr. netto og óbroytt fyri íløgur 122,9 mió. kr., í alt 124,7 mió. kr., og er útgreinað soleiðis:

| | **Rakstur** | **Íløgur** |
|---|---|---|
| TK | -4,4 mió | 79,5 mió |

| | | |
|---|---|---|
| TH | 6,2 mió | 43,4 mió |
| **Íalt** | **1,8 mió** | **122,9 mió** |

Samlaða meirnýtslan á rakstrarsíðuni fyri Tórshavnar kommunu frároknað Tórshavnar havn er nú -4,4 mió. kr. Á § 1 og 2 er talan um minninýtslu, í meðan tað á § 3,4,5,6 og 7 er talan um meirnýtslu.

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til at játtað framflyting á 1,8 mió. kr. til rakstur og 122,9 mió. kr. til íløgur. Eisini verður mælt til at gera broytingar í framflytingini sambært viðlagda broytingarskjali.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Einmælt samtykt.

# 113/25 Niðurtøka av Svarta pakkhúsi á Eystara Mola

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 01.04.2025 | 19/25 | 25/03788-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.04.2025 | 77/25 | 25/03788-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 113/25 | 25/03788-1 |

**Upprunin til málið**
Byggingin av nýggjum bygningi á molanum við farstøð, skrivstovum og pakkhúsi á molanum

**Lýsing av málinum**
Nú nýggjur bygningur "Molin" við farstøð, skrivstovum og pakkhúsi verður bygdur á molanum, skal gamla "Svarta pakkhúsið" á molanum takast niður. Niðurtøkan er ikki partur av høvuðsverkætlanini við "Molanum", ið Smyril Line stendur fyri at byggja.

Tórshavnar havn hevur boðið niðurtøkuna út sum undirhondsboð millum Articon og J&K Petersen. Articon hevði lægsta boðið áljóðandi 2,5 mió kr. Við 15% í ókendum útreiðslum verður samlaði kostnaðurin mettur til 2,875 mió.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Á íløguætlanini hjá Tórshavnar havn eru avsettar uml. 5,7 mió til niðurtøku av pakkhúsum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til at taka av tilboðnum frá Articon áljóðandi 2,5 mió kr., og at játtaðar verða 2,875 mió.kr. av íløgum hjá Tórshavnar havn, deild 7475, "P39 - Niðurtøka av pakkhúsum" til "P39SP - Niðurtøka svarta pakkhús", og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 01. apríl 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. apríl 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá Havnanevndini. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Einmælt samtykt.

# 114/25 Elinnlegging á Bacalao

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 01.04.2025 | 20/25 | 25/04357-17 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.04.2025 | 76/25 | 25/04357-17 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 114/25 | 25/04357-17 |

**Upprunin til málið**
Komandi frystigoymslan hjá Barðinum á Vestaru bryggju – J.nr. 23/03220.

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við, at Barðið skal byggja frystigoymslu á vestaru bryggju, má el-innleggingin til Bacalao umleggjast. Orsøkin er, at partur av Bacalao (slógvrúmið), har ið ein av høvuðs eltalvunum stendur, skal takast niður, umframt at elkaðalar liggja í lendinum, har ið frystigoymslan skal byggjast.

Tá ið málið um frystigoymsluna varð viðgjørt í 2023, samtykti býráðið at játta eina ávísa upphædd til at taka ein part av Bacalao niður. Í hesi upphædd varð ein partur avsettur til umlegging av el-innleggingini til Bacalao, men neyvar kanningar av el-innleggingini vórðu tó ikki gjørdar tá vegna ov stutt skotbrá. Barðið hevur síðani útsett bygginina av frystigoymsluni og enn er einki arbeiðið byrjað.

Tórshavnar havn hevur nú havt ein el-innleggjara at kanna el-innleggingarnar á Bacalao nærri, soleiðis at til ber at gera eina ætlan fyri hvussu umleggingin skal gerast.

Niðurstøðan av hesi kanning er, at verandi el-innlegging á Bacalao sum heild er í vánaligum standi. Øll innleggingin er gomul, innføringskaðalar eru gamlir, høvuðstalvurnar eru heilt gamlar og eru ikki heilt tryggar sambært installatørinum. Tað sæst, at man gjøgnum árini hevur lagt aftrat og lagt aftrat, og tí er el-innleggingin vorðin sera fløkjaslig við tíðini. Umleggingin av innleggingini verður tí væl meiri umfatandi og torgreidd enn hildið av fyrstan tí, og má fremjast í fleiri stigum.
Kanningin vísir eisini, at uttan mun til um frystigoymslan hjá Barðinum verður bygd ella ikki, so verður neyðugt at gera innleggingina til Bacalao av nýggjum sum skjótast, vegna trygdina (persónstrygd, brunatrygd og veitingartrygd til leigarar á Bacalao).

Installatørurin hevur saman við Tórshavnar havn og í samráð við SEV gjørt eina ætlan fyri, hvussu umleggingin kann gerast. Í stuttum fevnir umleggingin um at leggja nýggjar innføringskaðalar frá nýggjari trafostøð hjá SEV, uppseta nýggjar høvuðstalvur til innføringarnar, og umleggja forsýningar av verandi undirtalvum frá gomlu høvuðstalvunum og til nýggju høvuðstalvurnar. Umleggingin verður mett at kosta uml 1,6 mió kr.
Arbeiðið fevnir ikki um útskifting av undirtalvum ella elnetinum annars inni á Bacalao.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Býráðsfundur<br>24. april 2025 | Blað nr.: 301<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/læattar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til:

- at arbeiðið við at umleggja el-innleggingarnar til Bacalao verður framt sum skjótast soleiðis sum lýst er omanfyri.
- at arbeiðið verður fíggjað soleiðis, at fluttar verða 0,3 mió kr frá verkætlan "P39BAC - Niðurtøka Bacalao" og 1,3 mió kr frá "P39 – Niðurtøka av pakkhúsum" til verkætlan "P44 – Bacalao – umvæling".
- At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 01. apríl 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. apríl 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá Havnanevndini. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Einmælt samtykt.

# 115/25 Uppskot til reglugerð fyri útlutan av íbúðum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 09.04.2025 | 78/25 | 25/04036-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 115/25 | 25/04036-1 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við bygging av íbúðum á Argjahamri, har ásett er, at kommunan skal finna keypararnar, er umsitingin biðin um at gera eitt uppskot til reglugerð fyri, hvussu íbúðirnar kunnu lutast út.

**Lýsing av málinum**
Seinast kommunan fann keyparar til íbúðir, var tá slíkar vórðu bygdar Undir Kongavarða. Síðan tá er reglugerðin fyri útlutan av fastari ogn broytt, so hon bert umfatar grundstykki til hús.

Mett verður ikki, at tað er skilagott at útbyggja ta reglugerðina til at umfata íbúðir eisini, tí tað eru ymisk atlit til ymisku sløgini av bústøðum, og fer hetta sostatt at gera eina samlaða reglugerð torgreidda. Tí verður skotið upp at gera orða eina serstaka reglugerð fyri íbúðir, men aðalreglurnar eru í stóran mun tær somu. So sum at tað verður lutað út við lutakasti.

Serligt er tó, at skotið verður upp, at íbúðirnar verða lutaðar út til tríggjar ymiskar bólkar í hesari raðfylgi:

1. Borgarar í Tórshavnar kommunu, sum onga bústaðarogn eiga í kommununi
2. Borgarar í Tórshavnar kommunu, sum bara eiga eina íbúð í kommununi og búgva har
3. Borgarar í Tórshavnar kommunu yvir 60 ár, sum bara eiga eitt sethús, tvíhús ella raðhús í kommununi og búgva har

Man kann uttan iva finna ymiskar grundgevingar fyri, hvør bólkur skal vera nummar 2 ella 3. Umsitingin leggur upp til, at um tað eru fólk, ið eiga og búgva í íbúð, men ynskja størri íbúð, so er tað gott at lova teimum framat. Tí ynskja vit ein fjøltáttaðan bústaðarmarknað, har nøkur ynskja íbúð heila lívið, so mugu vit eisini skapa dynamikk fyri tey, so tey kunnu "rykkja upp" tá størri íbúðir eru tøkar. Tey, sum ynskja at "rykkja niður" úr sethúsum og í íbúðir, burdu ikki ynskt tær somu størri familjuíbúðirnar. So teoretiskt burdi ikki verið ein konflikt har.

Eisini er serligt við hesum uppskotinum til reglugerð í mun til grundstykkjareglugerðina, at kommunan fær í mesta lagi tveir møguleikar at skipa fyri tilmelding og lutakasti. Síðan fær byggiharrin loyvi at selja í fríari sølu. Grundgevingin fyri tí er, at tá hevur kommunan gjørt, hvat hon kann fyri at røkka teimum, ið tørva eina íbúð, og tá er rímiligt at byggiharrin sleppur at selja sjálvur.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
25/01926

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>24. april 2025 | Blað nr.: 303<br><br>Forkvinnunnar merki: |

**Skjøl**
Uppskot til reglugerð fyri útlutan a íbúðum.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | **Ja** | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:** Miðfyrisitingarstjórin, leiðarin á Stjórnardeildini og leiðarin á Snarskivuni mæla til, at fíggjarnevndin samtykkir uppskotið til reglugerð fyri útlutan av íbúðum.

**Fíggjarnevndin 09. apríl 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Einmælt samtykt.

# 116/25 Mannagongdir viðvíkjandi koyripengum til býráðs- og nevndarlimir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 09.04.2025 | 79/25 | 25/04602-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 116/25 | 25/04602-1 |

**Upprunin til málið**
Býráðspolitikarar búsitandi uttanfyri Havnina hava higartil ikki fingið koyripengar í sambandi fundir o.l., tí meginreglurnar hava verið grundaðar á tulkingum hjá TAKS, sum ásetur, at bara **løntakarar** hava rætt til koyripengar frá arbeiðsgevara í sambandi við nýtslu av egnum bili í arbeiðsørindum. Býráðspolitikarar fáa samsýning – og vera ikki tí roknaðir sum løntakarar – m.a. eftir Kunngerð um samsýning o.a. sambært kommunustýrislógini.

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við fyrispurning um koyripengar varð heitt á SPEKT um eina fakliga meting av hesum, og hava tey spurt TAKS, um býráðslimir hava rætt til koyripengar eftir §29, stk. 7, í skattalógini í sambandi við arbeiðið sum býráðslimur og nevndarlimur í kommunalum nevndum.

TAKS svaraði, at tey – vísandi til rundskriv nr. 1/1997 um skattliga viðgerð av endurgjøldum fyri ferðaútreiðslur v.m. hjá nevndarlimum o.ø. – høvdu endurmett sína støðu, at tey nú meta, at endurgjald kann veitast í hesum førum. Í rundskrivinum verður tó ikki nágreinað, hvørjar ferðaútreiðslur eru fevndar av rundskrivinum.

Í útgreinandi svari frá TAKS hava tey upplýst, at tey *”hava umrøtt hetta internt og halda at ásetingarnar í rundskrivinum kunnu brúkast til býráðslimir. Vit meta tó, at hetta skal avmarkast til regluligar fundir í býráðnum og regluligar fundir í teimum nevndum har býráðslimurin er partur av. Vit meta hinvegin ikki, at ásetingin kann brúkast til alt virksemi sum er tengt at, at verða limir í einum býráði.”*

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 86 frá 1. sept. 1993 um landsskatt og kommunuskatt, sum seinast broytt við Ll nr. 145 frá 20. des. 2024.

Kunngerð um samsýning o.a. sambært kommunustýrislógini (K.nr. 93 frá 9. sept. 2014).
TAKS: Rundskriv nr. 1/1997 Um skattliga viðgerð av endurgjøldum fyri ferðaútreiðslum v.m. hjá nevndarlimum o.ø.

Mannagongd: "Koyripengar til býráðs- og nevndarlimir"; TK-Starvsfólkadeildin.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Nú TAKS hevur broytt tulking av reglunum um koyripengar, verður mett, at býráðs- og nevndarlimir, ið búgva í eini fjarstøðu á í minsta lagi 10 km frá Havnini, kunnu fáa endurgjald fyri flutning millum heim og fundarstað, tá møtt til regluligar fundir. Hetta er sama mark, sum er galdandi fyri at fáa ferðastuðul frá tí almenna, har fjarstøðan millum bústað og arbeiðsstað skal vera meira enn 20 km aftur og fram.
Bygdirnar í kommununi, ið hetta er galdandi fyri, eru samb. ásettu vegalongd hjá Landsverki: Velbastaður (13,19 km), Norðadalur (15,58 km), Kirkjubøur (16,12 km), Kaldbak (18,45 km), Langasandur (19,95 km), Syðradalur (20,13 km), Oyrareingir (20,25 km), Við Sjógv, Kollafj. (22,91 km).
Koyripengar skulu latast eftir uppgerð so hvørt sambært mannagongdini "Koyripengar til býráðs- og nevndarlimir".
Nevnast skal, at aðrar kommunur ikki veita politikarum koyripengar. Upp á fyrispurning kendu tey í Sunda og Runavíkar kommunum – ið eisini hava politikarar, ið skulu koyra yvir 10 km fyri at koma á fund – einki til nýggju tulkingina hjá TAKS.

**Fíggjarligar avleiðingar**

Í løtuni er tað bara ein býráðslimur, ið lýkur samlaðu treytirnar fyri at fáa koyripengar. Hesin er búsitandi við Sjógv í Kollafirði. **Árligu útreiðslurnar fyri TK fyri hetta verða kr. 7.624,45.**

Um fólk í øðrum bygdum í kommununi í framtíðini gerast býráðslimir, sum ikki frammanundan fáa koyripengar frá tí almenna, verða árligu útreiðslurnar fyri TK við verandi satsum fyri hvønn hesar:

**Mettir koyripengar til býráðslim búsitandi uttanfyri Tórshavn/Argir/Hoyvík/Hvítanes**

| | Km | Km t/r | Kr/km | Kr. | Fundir/ár* | Kr/ár |
| --- | --- | --- | --- | --- | --- | --- |
| Velbastaður | 13,19 | 26,38 | 3,20 | 84,42 | 52 | 4.389,63 |
| Norðadalur | 15,58 | 31,16 | 3,20 | 99,71 | 52 | 5.185,02 |
| Kirkjubøur | 16,12 | 32,24 | 3,20 | 103,17 | 52 | 5.364,74 |
| Kaldbak | 18,45 | 36,90 | 3,20 | 118,08 | 52 | 6.140,16 |
| Langasandur | 19,95 | 39,90 | 3,20 | 127,68 | 52 | 6.639,36 |
| Syðradalur | 20,13 | 40,26 | 3,20 | 128,83 | 52 | 6.699,26 |
| Oyrareingir | 20,25 | 40,50 | 3,20 | 129,60 | 52 | 6.739,20 |
| Við Sjógv, Kol. | 22,91 | 45,82 | 3,20 | 146,62 | 52 | 7.624,45 |

**) Roknað er við 12 føstum fundum árliga (býráð og 3 fastar nevndir) umframt 4 fundir í eini staðbundnari nevnd*

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Sak: 21/02495: Endurgjald fyri ferðaútreiðslur til býráðs- og nevndarlimir.
Sak: 22/01007: Mannagongdir viðvíkjandi koyripengum til býráðs- og nevndarlimir

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
Dagførd mannagongd at leggja í politikarahondbókini: "Koyripengar til býráðs- og nevndarlimir", dagf. 01.05.2025.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| | **Býráðsfundur**<br>24. april 2025 | Blað nr.: 306<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla fíggjarnevndini til at umrøða málið.

**Fíggjarnevndin 09. apríl 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála, tekur undir undir við uppskotinum til mannagongdina "Koyripengar til býráðs- og nevndarlimir".

Ein minniluti, Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við málinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Tikið av skrá.

| | **Býráðsfundur**<br>24. april 2025 | Blað nr.: 307 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

# 117/25 Ársroknskapur fyri Tórshavnar kommunu 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 24.04.2025 | 83/25 | 25/03984-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 117/25 | 25/03984-1 |

**Upprunin til málið**
Kommunustýrislógin inniheldur ásetingar um grannskoðan av kommununum.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**
Kommunustýrislógin:

Sambært § 45-47 er tað eitt krav, at kommunur hava óhefta og sakkøna grannskoðan, ið er ríkisgóðkend ella skrásett.

Sambært § 38, stk 3, nr 4 hevur fíggjarnevndin ábyrgd av at leggja grannskoðaðan roknskap saman við grannskoðanarfrágreiðingini (grannskoðanarprotokollin, red) fyri kommunustýrið til góðkenningar og undirskrivingar.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- Grannskoðanarporotokoll fyri ársroknskapin 2024
- Ársroknskapur 2024

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:** Stjórnin mælir býráðnum umvegis fíggjarnevndina til at góðkenna grannskoðaða ársroknakapin fyri 2024.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>24. april 2025 | Blað nr.: 309<br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

# 118/25 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.02.2025 | 38/25 | 25/00161-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 64/25 | 25/00161-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.03.2025 | 58/25 | 25/00161-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 90/25 | 25/00161-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 24.04.2025 | 85/25 | 25/00161-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 118/25 | 25/00161-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Ískoyti:**

Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 26. februar 2025:** Framlagt.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. mars 2025:** Framlagt.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2025:** Framlagt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Einmælt samtykt.

# 119/25 Umsókn um byggiloyvi til eitt nýtt røktarheim á Stórubrekku, RÁS, matr. nr. 138a, Hoyvík - 24/01675

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 31.03.2025 | 50/25 | 25/03625-10 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 119/25 | 25/03625-10 |

**Upprunin til málið**
Vísandi til hjálagda skjal málslýsing jnr. 24/01675-4, samtykt tann 13.05.2024.

**Lýsing av málinum**
Vísandi til hjálagda skjal málslýsing jnr. 24/01675-4

**Lógir, ásetingar o.a.**
Vísandi til hjálagda skjal málslýsing jnr. 24/01675-4

**Upplýsingar frá umsitingini**
Málið hevur nú verið úti til hoyringar hjá 22 grannum í Dýrindalsgøtu, Olivantsgøtu, Olgarsgøtu, Sivjugøtu og Ovarugøtu.

Inn komu 3 hoyringsviðmerkingar (hjálagdar).

Viðmerkingarnar eru viðgjørdar á Byggimálsdeildini, og eitt felags svarskriv er gjørt (viðlagt).
Heildarmeting er gjørd (hjáløgd).

Út frá hoyringsviðmerkingunum og viðgerðini av teimum og út frá heildarmetingini hjá kommununi metir umsitingin, at tað er ikki orsøk til at broyta avgerðina viðv. givna byggiloyvinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Ongi onnur mál.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Prosjektið er gjørt í samráð við aðrar deildir.

**Skjøl**

| | | |
|---|---|---|
| 24/01675-4 | Upprunaliga málslýsingin, samtykt 13.05.2024. | |
| 25/03625-4 | Hoyringsskriv | |
| 25/03625-6 | Hoyringstilfar | Planur |
| | | Skurðir í lendi og bygningar |
| | | Visualiseringar |
| | | Serstøk byggisamtykt fyri Stórubrekku |
| 25/03625-7 | Mótmæli – viðmerkingar til hoyringsskriv.... | |
| 25/03625-8 | Viðmerkingar til hoyringsskriv vegna Eigarafelagið Hoyvíkshædd | |
| 25/03625-9 | Viðmerkingar til hoyringsskriv | |
| 25/03625-11 | Felags svarskriv til tey, sum vóru hoyrd viðv. byggingini | |
| 25/03625-12 | Heildarmeting | |

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at staðfesta givna byggiloyvi frá 6. juni 2024 til bygging av Røktarheimi á Stórubrekku, vísandi til, at viðmerkingarnar frá grannunum ikki geva orsøk til at broyta avgerðina viðv. givna byggiloyvinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Kári Johansen biður um at fáa málið á skrá til býráðsfundin.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Málið umrøtt.

**FUNDURIN LOKIN KL.19:15**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Elsa Berg | Heðin Mortensen | Heidi Lava Elgeirsdóttir |
| Annita á Fríðriksmørk | Anja Weyhe | Elin Heðinsdóttir Joensen |
| Bergur Robert Dam Jensen | Guttormur í Skála | Annfinn Brekkstein |
| Tróndur Sigurðsson | Kári Johansen | Høgni Vilhelmsen |
| | Astrið Breckmann | |